Álit um

# Eitt føroyskt fátækramark

Arbeiðsbólkur um fátækramark 2014

# Fororð

Tíðliga í 2011 legði Miðflokkurin fyri Løgtingið eitt uppskot til samtyktar um ásetan av einum føroyskum fátækramarki. Uppskotið varð samtykt av Løgtinginum á vári 2011. Samtykta uppskotið var soljóðandi:

> "*Løgtingið heitir á landsstýrið um at seta ein arbeiðsbólk av serkønum at útgreina, hvat í minsta lagi skal til hjá einum húsarhaldi fyri at kunna hava sámilig livikor, og síðani leggja fyri Løgtingið viðkomandi lógaruppskot*"

Á heysti 2012 valdi Landsstýrið at fara undir arbeiðið, og landsstýriskvinnan í almannamálum, Annika Olsen, orðaði í tí sambandi ein arbeiðssetning fyri arbeiðið.

Landsstýriskvinnan metti, at neyðugt var at fara meira grundleggjandi til verka, enn løgtingssamtyktin legði upp til, tí spurningurin um fátækramark hevur við sær nógvar spurningar um nógv ymisk viðurskifti. Granskarar og serfrøðingar eru ymisk á máli um, hvussu fátækramark kann brúkast, og hvønn leiklut fátækramark kann hava í sambandi við átøk móti fátækradømi. Tí er neyðugt at fáa eina meira grundleggjandi fatan av fátækradømi, hvussu eitt fátækramark kann brúkast, og hvussu vit fáa eitt fátækramark, sum er egnað til føroysk viðurskifti.

Landsstýriskvinnan setti ein arbeiðsbólk til m.a. at lýsa ymsar hættir at áseta fátækramark og nágreina, hvat eitt fátækramark kann brúkast til. Ætlanin er, at arbeiðið skal styrkja grundarlagið undir arbeiðinum hjá landsstýrinum at áseta eitt fátækramark.

Arbeiðsbólkurin var samansettur soleiðis:

- Heri Petersen, Almannamálaráðið (samskipari)
- Michael Feldballe Hansen, Almannamálaráðið
- Høgni Vilhelm, Hagstova Føroya
- Jóannes Jacobsen, Copenhagen Business School og Fróðskaparsetur Føroya
- Marjun Berg, Almannaverkið

Sonja Jógvansdóttir umboðandi Samtak varð tilnevnd at vera við í arbeiðsbólkinum. Hon hevur luttikið á øllum arbeiðsfundum og hevur givið sítt íkast til álitið. Men hon valdi at taka seg úr bólkinum, stutt áðrenn álitið varð handað landsstýriskvinnuni í almannamálum.

# Innihaldsyvirlit


1. Samanumtøka ... 7

Føroyska fátækramarkið ... 8

2. Inngangur ... 11

Støðan í Føroyum í dag – hvat vita vit um fátækradømi ... 12

Allýsing av fátækradømi ... 12

3. Ymisk fátækramørk ... 15

Inntøkuhátturin (Lutfalsligt fátækramark) ... 15

Búsketthátturin ... 17

Føroyska minstabúskettið ... 20

Saknhátturin ... 25

4. Fátækramørk í øðrum londum ... 27

Norra ... 28

Svøríki ... 28

Ísland ... 29

Danmark ... 30

Írland ... 31

Stórabretland ... 32

5. Inntøkuhátturin - føroysku úrslitini ... 33

Føroyski bústaðarmarknaðurin og inntøkuhátturin ... 34

Býtisbúskapur (naturaløkonomi) ... 37

Stakir uppihaldarar í serligum fátækraváða ... 37

Fólkapensjónistar og fátækradømi ... 39

Fátækradømi og sosialar veitingar ... 42

6. Jólahjálp frá ÍMGT ... 45

7. Niðurstøða ... 49

Fylgiskjal 1 ... 53

Skjalalisti ... 53

# 1. Samanumtøka

Eitt grundleggjandi endamál við vælferðarsamfelagnum er at sleppa undan fátækradømi, og sostatt er eisini eitt breitt politiskt ynski um at beina burtur fátækradømi í Føroyum. Sambært arbeiðssetninginum[1], sum hesin arbeiðsbólkurin hevur at arbeiða eftir, skulu vit koma við tilmælum um eitt føroyskt fátækramark. Eitt fátækramark skal stuðla landsstýrinum í at eyðmerkja fátækradømi og harvið geva landsstýrinum betri grundarlag at seta í verk átøk at fyribyrgja fátækradømi.

Vit ásanna, at persónliga vælferðin og møguleikin fyri einum virknum lívi í stóran mun er tengt at fíggjarligum rásarúmi hjá einstaklingum og familjum, og tí eru tað nýtslumøguleikarnir hjá borgarunum, ið avgera, hvørt ein persónur ella familja liva í fátækradømi. Arbeiðsbólkurin hevur definerað fátækradømi soleiðis:

> *At vera varandi avmarkaður frá at liva eitt lív við teimum materiellu ressursunum, sum eru í tráð við alment akspeterað livikor og lívshátt og ikki hava møguleika fyri sjálvur at koma sær úr støðuni.*

Tað eru ymsir hættir at áseta fátækramark, og tað er ymiskt, hvussu tað verður brúkt í ymsum londum. Danmark er einasta norðurlandið, sum hevur eitt alment fátækramark, og tað eru annars bert heilt fá OECD-lond, sum hava alment fátækramark. Men fátækramark er tó eitt hugtak, sum fær nógva umrøðu í flestu londum. Felagsskapir, granskarar, kommunur o.o. brúka og definera fátækradømi og fátækramark í ymsum sambondum, men sum nevnt verður tað í flestu londum ikki brúkt sum eitt alment mark, ið definerar, hvør er fátækur og ikki fátækur, og hvør hevur rættindi til fíggjarligan stuðul.

Í Føroyum hava vit tær somu avbjóðingarnar sum í øðrum londum. Nýtslumøguleikar eru fyrst og fremst ein spurningur um inntøku, men onnur viðurskifti so sum ogn og annað tilfeingi kann hava týdning. Tað vil siga, at tað er ikki gjørligt at áseta <u>eitt</u> mark, sum er gjørt við <u>einari</u> metodu, sum á ein objektivan hátt kann eyðmerkja øll fátøk, ella sum eintýðugt kann lýsa, hvat er eitt rímiligt livistøði. Tað vilja altíð vera fólk, sum hava inntøku hægri enn markið, sum eru fátøk, og tað vilja eisini vera fólk við inntøku undir markinum, sum ikki líða nakra neyð.

Kortini metir arbeiðsbólkurin, at eitt fátækramark hevur týdning fyri stríðið móti fátækradømi, hóast at eitt fátækramark í sær sjálvum ikki hevur við sær, at tað gerast færri fátøk. Øll hava áhuga í, at vit ikki hava fátøk fólk í Føroyum – bæði í mun til menniskjansligu atlitini og eisini fyri samfelagsins besta. Ymisk fátækramørk geva ymiskar myndir av fátækradømi, og tað kann grugga fátækrakjakið. Tí er tað ein fyrimunur við einum alment viðurkendum fátækramarki, soleiðis at politiski myndugleikin kann seta sær mál, og at sjóneykan verður móti loysnum. Eitt fátækramark, ið kann vera brúkt sum eitt mát, og sum skal vera við til at lýsa gongdina í talinum av fátøkum, er við til at stuðla undir møguligar politiskt orðaðar visjónir og

[1] Fylgiskjal 1

politisk átøk. Tað, at áseta eitt fátækramark merkir ikki, at trupulleikin við fátækradømi skal loysast á ein ávísan hátt, men markið er við til at varpa ljós á fátækradømi og gevur betri grundarlag fyri at umrøða, á hvønn hátt loysnir kunnu fremjast.

## Føroyska fátækramarkið

Fátækradømi er fyrst og fremst ein spurningur um fíggjarligar ressursir, og arbeiðsbólkurin lýsir sostatt fátækradømi við støði í inntøkuháttinum – sí síðu 15, har hátturin verður lýstur. Markið fyri fátækradømi er ásett til 60 prosent av miðinntøkuni, sum eisini er eitt mark, sum Hagstova Føroya í árligum kanningum brúkar sum mark fyri at vera í fátækraváða. Hini norðurlondini brúka í høvuðsheitum eitt mark á 50 prosent av miðinntøkuni, men arbeiðsbólkurin hevur við støði í sokallaða búsketttháttinum, sí síðu 17, mett, at 60 prosent markið er meira hóskandi í Føroyum.

**Mánaðarlig upphædd sbrt. inntøkuháttinum 2013**[2]

| | 60 % av miðinnt. |
|---|---:|
| Støk | 9.796 |
| Par uttan børn | 14.770 |
| Støk við einum barni | 12.800 |
| Støk við tveimum børnum | 15.754 |
| Par við tveimum børnum | 20.677 |
| Par við 4 børnum | 26.585 |

At vera fátækur í longri tíð er tað, sum kann hava álvarsligar avleiðingar fyri tann einstaka og ta einstøku familjuna, og fyri at koma undir fátækramarkið, skal inntøkan hava verið lægri enn 60 prosent av miðinntøkuni í 3 ár á rað. Men nýggjasta granskingin um fátækradømi vísir, at fyri børn kann eisini stutttíðar fátækradømi fáa neilig árin seinni í lívinum. Tí eigur áhaldandi dentur at verða lagdur á fátøk børn – eisini stutttíðar fátækradømi hjá børnum.

Fyri at kunna siga neyvari, hvussu nógv fólk eru fátøk í Føroyum sambært lýsingini hjá hesum arbeiðsbólkinum, er neyðugt at útgreina kanningarnar hjá Hagstovu Føroya, m.a. soleiðis at lesandi verða eyðmerkt. Sambært allýsingini av fátækradømi er tað ein treyt fyri at vera fátækur, at talan er um eina støðu, sum tað ikki er gjørligt við egnari hjálp at koma úr. Tað vil siga, at talan er ikki um eina sjálvvalda støðu. Sostatt hevur arbeiðsbólkurin í útgangsstøðinum avmarkað fólk í útbúgving frá at hoyra til bólkin av fátøkum, tí vanliga er talan um eina sjálvvalda fyribils støðu, sum broytist, tá útbúgvingin er liðug.

Í Føroyum eru tað serliga stakir uppihaldarar, sum eru fátøk. Hesi hava inntøkur, ið liggja langt undir inntøkurnar hjá øðrum bólkum. Hetta er tann bólkurin, sum vísir seg í øllum londum at vera fátøk ella lutfalsliga fátøk.

[2] Seinasta uppgerðin frá Hagstovu Føroyar er frá 2011. Talið fyri 2011 er framskrivað til 2013 við miðalvøkstrinum fyri árini 2009 til 2011.

Í øðrum londum, sum vit vanliga samanbera okkum við, eru tað serliga fólk, ið eru uttan fyri arbeiðsmarknaðin, sum eru fátøk. Hetta er eisini galdandi í Føroyum, men tó í minni mun enn í hinum norðurlondunum, tí nakrar av sosialu veitingunum í Føroyum eru hægri enn fátækramarkið.

Eitt serligt fyrivarni við einum føroyskum fátækramarki er viðvíkjandi føroyska bústaðarmynstrinum. T.d. kunnu borgarar omanfyri fátækramarkið hava høgar bústaðarútreiðslur, meðan borgarar undir markinum kunnu hava lítlar útreiðslur til bústað. M.a. hetta fyrivarni merkir, at arbeiðsbólkurin sum útgangsstøði metir, at fólkapensjónistar ikki hoyra til bólkin av fátøkum, hóast at fólkapensjónistar í hagtølunum eru yvirumboðaðir í bólkinum av føroyingum, ið hava inntøku lægri enn 60 prosent av miðinntøkuni. Tað eru eisini fátækir fólkapensjónistar, men hesi eru fyrst og fremst tey, sum hava útreiðslur til bústað og hava aðrar serligar umstøður. Niðurstøðan um fólkapensjónistar byggir á eina livikorskanning um fólkapensjónistar, umframt onnur hagtøl.[3]

[3] Í triðja aldri ráða vit yvir degnum – ein kanning av livikorum hjá fólkapensionistum, Fróðskaparsetur Føroya 2010

## 2. Inngangur

Eitt lív í fátækradømi hevur stórar avleiðingar – ikki bara fyri tann einstaka, men eisini fyri samfelagið. Fátækradømi ávirkar avrik hjá børnum á útbúgvingarøkinum og harvið eisini møguleikarnar hjá hesum børnum seinni í lívinum. Kanningar í øðrum londum vísa, at børn, ið vaksa upp í fátøkum familjum, hava verri útlit seinni í lívinum at fáa arbeiði ella at fáa eina útbúgving enn børn, ið vaksa upp í familjum, sum eru fíggjarliga væl fyri.[4] Fortreytirnar hjá hesum børnum at blíva vælvirkandi samfelagsborgarar eru sostatt ikki eins góðar sum hjá øðrum børnum, og tað hevur samfelagsligar avbjóðingar við sær á fleiri økjum.

Gransking í øðrum londum vísir eisini, at fólk við lágum inntøkum hava vánaligari heilsustøðu enn onnur. Heilsuverkið brúkar lutfalsliga fleiri ressursir upp á hendan bólkin, enn upp á borgarar annars, og fólk við lágum inntøkum hava lægri livialdur.[5]

Eisini í norðurlondum, sum hava eitt breitt sosialt trygdarnet, har fólk uttanfyri arbeiðsmarknaðin eru tryggjað eina inntøku á einum høgum støði samanborið við aðrar partar av heiminum, er tað viðkomandi at tosa um at fyribyrgja fátækradømi. Sjálvandi eru tað menniskjansligu atlitini um eitt sámiligt samfelag fyri øll - at borgarar eru tryggjaðir eitt lívsgrundarlag og ikki skulu bidda á gøtunum ella fremja lógarbrot. Men stríðið móti fátækradømi hevur eisini eitt samfelagsligt endamál. Tað er ein partur av tí norðurlendsku vælferðarskipanini, at vit hava ein smidligan arbeiðsmarknað, at tey flestu megna at vera fíggjarliga sjálvbjargin við at arbeiða og harvið við til at fíggja vælferðina, og at vit hava trygg sosial viðurskifti og harvið eitt stabilt samfelag.[6]

At børn uppliva fátækradømi er ein serligur trupulleiki - bæði fyri samfelagið og fyri børnini sjálvi, sum eru rakt av fátækradømi í mun til vaksin, sum uppliva fátækradømi. Fyrst og fremst hava børnini ikki møguleika sjálvi at gera nakað við støðuna og at koma sær burturúr fátækradømi. Hjá vaksnum er tað serliga langtíðar fátækradømi, sum hevur langtíðar árin, men kanningar vísa, at hjá børnum kann eisini stutttíðar fátækradømi hava ávirkan á livikorini seinni í lívinum. Tað er ein røð av ymiskum viðurskiftum, sum hava ávirkan á framtíðarútlitini hjá børnum, so sum sosialar- og mentanarligar ressursir hjá foreldrum, og hvussu foreldur raðfesta sínar ressursir o.a. Tað kann ikki sigast eintýðugt, hvat ávirkar hvat, men greitt er, at avmarkað fíggjarligar rásarúm er eitt týðandi element.

Tað vil siga, at umframt menniskjansligu atlitini eru eisini orsøkir at síggja fyribyrging av fátækradømi sum eina íløgu fyri samfelagið.

---

[4] Joint report on Social Protection and Social Inclusion - European Commission 2010
Den sociale arv tynger Danmark – AE 2011
[5] Reducing health inequalities in the European Union – European Commission 2010
[6] Utfordringer for den nordiske velferdsstaten, Nososco 2013

## Støðan í Føroyum í dag – hvat vita vit um fátækradømi

Tað eru umleið 450 familjur við umleið 900 børnum, sum á hvørjum ári fáa hjálp frá felagsskapinum "í menniskjum góður tokki" (ÍMGT), svarandi til umleið 7 prosent av øllum børnum í Føroyum. Tað eru bert familjur við børnum, og sum hava sera trong fíggjarlig kor, sum fáa hjálp frá ÍMGT. Sambært heimasíðuni hjá felagsskapinum[7] vóru tað 200 av teimum barnafamiljum, sum í 2012 fingu jólahjálp frá ÍMGT, sum høvdu minni enn 50 kr. at liva fyri um dagin. Umleið 75 prosent av umsøkjarunum, ið hava søkt um fíggjarligan stuðul frá ÍMGT, hava søkt fyrr.

Í eini kanning hjá Fólkaheilsuráðnum – Gallup World Poll – svaraðu 7 prosent av teimum spurdu, at tey seinasta árið hava upplivað at hava havt trupult við at hava pening til mat, meðan 4 prosent svaraðu, at tey ikki høvdu havt nóg mikið av peningi til býli.[8]

Sostatt eru ábendingar um, at vit í Føroyum hava húski í fátækradømi.

At fátækradømi í stóran mun hevur merkt politisku dagsskránna, kunnu vit ikki siga. Nakrir politikarar hava í fleiri umførum roynt at fáa politiska myndugleikan at taka evnið upp, og hava lagt trýst á fyri at fáa eitt føroyskt fátækramark.[9] Virksemið hjá ÍMGT savnar seg um jóltíðir, og nakað av uppmerksemi er sostatt eisini um hetta mundið. Tað var júst í kjalarvørrinum av kjakinum, sum fyri nøkrum árum síðani stóðst av jólahjálpini hjá ÍMGT, har nógv varð tosað um væntandi vitan um fátækradømi í Føroyum, at ressursir vórðu eyðmerktar til at gera kanningar um inntøkubýti í Føroyum. Hagstova Føroya hevur síðstu trý árini í hesum sambandi við inntøkuhagtølum framleitt eitt fátækramark - tað sokallaða fátækraváðamarkið (At Risk of Poverty). Hetta er tað fátækramarkið, sum flest lond nýta at eyðmerkja tey, sum eru fátøk.

Tó so, landsstýrið hevur gjørt av at fara undir víðari arbeiði av fátækramarki og at lýsa fátækradømi. Fátækradømi í Føroyum skal ikki einsamalt verða ein spurningur um inntøkur, men skal lýsast út frá øðrum sjónarhornum og verða stuðlað av øðrum metodum fyri at geva eina breiðari mynd av og lýsa fátækradømi í Føroyum.

## Allýsing av fátækradømi

Fyri at kunna siga, hvør er fátækur, og hví tey eru fátøk, so er neyðugt við eini allýsing av fátækradømi. Hvat er tað at vera fátækur?

Ein grundleggjandi allýsing av fátækradømi er *vantandi fíggjarligar og/ella materiellar ressursir*. So kunnu vit spyrja víðari: nær er saknurin so stórur, at talan er um fátækradømi? Í nógvum pørtum av heiminum er viðkomandi at viðgera spurningin um treytaleyst fátækradømi – tað er ikki at hava ressursir til grundleggjandi tørv.

[7] www.takk.fo
[8] Føroyar besta land í heiminum, Fólkaheilsuráðið 2013
[9] Lm. 85/2010 Uppskot til samtyktar um ásetan av fátækramarki

Grundleggjandi tørvur er føði, klæðir, og tak yvir høvdið. Tað er hetta, sum liggur til grund fyri almenna fátækramarkinum í USA, sum er grundað á eina kurv av vørum, sum skal til fyri at kunna liva heilsuliga forsvarligt.

Treytaleyst fátækramark er serliga viðkomandi í ikki-framkomnum londum, har tað ikki er ein sjálvfylgja at fáa nøktað grundleggjandi tørvir. Í fjølmiðlunum hava vit tó hoyrt um fólk í Føroyum, sum ikki hava ráð at keypa mat til sín sjálvs, tí tey raðfesta børnini fram um. Hjálparfelagsskapurin ÍMGT vísir eisini á, at hetta er vanligt í nógvum familjum í Føroyum. Hetta má metast at vera nakað, sum líkist treytaleysum fátækradømi.

Í norðurlondum og her í Føroyum er tó meira vanligt og viðkomandi at viðgera spurningin um lutfalsligt fátækradømi ella at vera í fátækraváða. Tað vil siga, at livikorini skulu síggjast í mun til tað samfelag, sum ein er partur av. Menniskja er ikki bara ein vera við grundleggjandi kropsligum tørvi, men er ein sosialur samfelagsborgari, sum skal liva og virka á jøvnum føti við onnur.

Tað vil siga, at vit viðurkenna, at fátækradømi ikki einans kann byggjast á, at menniskja hevur objektivan tørv, men at hesi eru tengd at tí samfelagi, sum mann er partur av. Fátækrahugtakið fær sostatt ein sosiologiskan relevans, tí umframt fíggjarligan mátt verður talan eisini um sosiala integrasjón.

Tað, at kunna liva og virka á jøvnum føti við onnur, merkir, at tað er gjørligt at fáa tann kost, luttaka í tí virksemi og hava tey livikor, sum eru vanlig, ella í minsta lagi eru alment viðurkend í tí samfelagnum, sum ein er partur av.

Tað vil siga, at við hesi verkætlanini verður stílað hægri enn treytaleysa fátækradømið. Miðað verður ímóti at áseta eitt minstamark fyri tí livistøði, sum mett verður, at borgarar í Føroyum í minsta lagi skulu hava. Avbjóðingin er at allýsa minstamarkið og at definera, hvat skal leggjast til grund fyri markinum. Hvat krevst fyri at halda seg omanfyri minstamarkið er ikki eitt fast virði. Ymisk samfeløg hava sjálvandi ymisk minstumørk, og minstamarkið broytist eisini yvir tíð innanfyri tað einstaka samfelagið.

Í grundini er talan um fíggjarligt fátækradømi, tí tað er vantandi fíggjarligir ressursir, sum skulu vera orsøk til, at tað ikki er gjørligt at liva eitt nøktandi lív og fáa til vega materiellu ressursirnar.

At vera fátækur er varandi at vera avmarkaður frá teimum materiellu ressursunum og avmarkaður frá at liva eitt lív, sum er í tráð við alment akspeterað livikor og lívshátt, og tað ikki er møguligt sjálvur at koma úr støðuni. T.v.s., at fátækradømi er ikki nakað, sum er sjálvvalt. Havast skal í huga, at fátækur er ikki nakað, mann er í ein dag ella tveir mánaðir. Lesandi, sum bert liva av ÚS, eru sostatt ikki fátøk, tí vanliga er talan um eina sjálvvalda støðu, sum sannlíkt verður broytt, tá útbúgvingin er liðug. Harumframt eru nøkur, sum sjálvi hava valt ein øðrvísi lívsstíl við avmarkaðum materiellum livistøði, sum vit heldur ikki síggja sum fátøk.

# 3. Ymisk fátækramørk

Tað eru ymiskir hættir at áseta fátækramark, og tað er ymiskt, hvussu hesi vera brúkt í ymiskum londum. Tað eru tó tríggir hættir, sum vanliga verða tiknir fram, og sum meir og minni verða brúktir í øðrum londum. Hesir eru:

- Inntøkuhátturin (hevur verið framleitt av Hagstovu Føroya síðani 2011)
- búsketthátturin
- saknhátturin

Omanfyri eru nevndir tríggir ymiskir hættir, sum vanliga verða brúktir í øðrum londum í sambandi við fátækrakjakið. Felags fyri hesar tríggjar hættirnar er, at teir hava sínar avmarkingar og kunnu ikki verða brúktir einsamallir fyri at geva eina fullfíggjaða mynd av fátækradømi. Allir tríggir hættirnir hava sínar avmarkingar, men hava eisini sínar dygdir og kunnu verða tiknir við, tá talan er um at áseta eitt fátækramark.

## Inntøkuhátturin (Lutfalsligt fátækramark)

Árligar kanningar eftir inntøkuháttinum hava síðani 2011 verið gjørdar av Hagstovu Føroya.

Sum heitið sipar til, so eru tað inntøkurnar hjá húskjum, sum verða brúktar til at máta fátækradømi. Sambært hesum háttinum eru tað inntøkurnar, sum seta eitt ovara mark fyri nýtslumøguleikunum, og tað eru inntøkurnar, sum siga nakað um vælferðina hjá einstøku familjunum.

Inntøkuhátturin er tann háttur, sum er altjóða mest viðurkendur til at máta fátækradømi, og sum vanliga verður brúkt til samanberingar tvørtur um landamørk. Sostatt er tað inntøkuhátturin, sum vanliga verður sipað til í OECD-høpi, tá talan er um fátækradømi. Í altjóða samanberingum er tað so at siga einans inntøkuhátturin, sum verður brúktur til samanberingar. Tað er rímilig semja um háttin, samstundis sum tað í flestu londum finnast hagtøl um inntøkur hjá borgarum, sum ger tað gjørligt at brúka hetta til samanberingar. Tað er ikki við øðrum háttum gjørligt at samanbera tvørtur um landamørk, tí neyðugu hagtølini finnast ikki, og í veruleikanum eru aðrir hættir ikki egnaðir at gera samanberingar við.

ES hevur sett sær sum mál at lækka fátækradømi, og tað er júst inntøkuhátturin, sum verður brúktur í hesum sambandi.[10] Í ES eru 80 mió. fólk, sum sambært inntøkuháttinum liva í fátækradømi, svarandi til, at umleið hvør sætti europeari livir í fátækradømi. Málið hjá ES er, at hetta talið í 2020 skal vera lækkað við 20 mió. fólkum, svarandi til eina lækking upp á 25 prosent.

[10] Evaluation of the European Year for Combating Poverty and Social Exclusion – European Commission 2011

Við inntøkuháttinum er tað tøka inntøkan, ið verður mátað. T.v.s. allar inntøkurnar hjá húskinum frároknað allur inntøkuskattur og kravd gjøld. Við hesum mátinum finst ein miðinntøka í landinum, og so verður fátækramarkið ásett sum ein prosentsatsur av miðinntøkuni. Miðinntøkan er tann mittasta inntøkan. Helvtin av borgarunum hava størri inntøku, og hin helvtin hava minni.

Orðið "javnvirðisinntøka" er eitt lyklaorð í hesum sambandi. Tað vil siga, at í sjálvum mátinum verður hædd tikin fyri, at familjurnar eru ymiskliga samansettar – t.v.s. at við inntøkuháttinum verður hædd tikin fyri, at talið av vaksnum og børnum er ymiskt í teimum einstøku húskjunum. Eitt stórt húski má hava størri samlaða inntøku enn eitt lítið, men samstundis eru eisini fíggjarligir fyrimunir í einum stórum húski.[11]

At máta fátækradømi við inntøkuháttinum hevur nakrar vansar og avbjóðingar. Fyrst og fremst vísa kanningar eftir hesum háttinum, at nakrar familjur hava lægri inntøku enn aðrar. Um tey, sum eru undir markinum, kunnu liva sámiliga, kann ikki lýsast við inntøkuhátturin. Eisini kann inntøkuhátturin yvirmeta fátækradømi hjá teimum bólkum, sum liva av naturaløkonomi, býtisbúskapi o.t. Harumframt kunnu bæði skuldarviðurskifti og ognarviðurskifti ávirka møguleikarnar hjá borgarum at liva eitt sámiligt lív. Inntøkuhátturin fevnir ikki um skuldar- og ognarviðurskifti, og tí kunnu greiningar av hesum viðurskiftum betra um lýsingar av fátækradømi.[12]

Hóast atfinningar móti inntøkuháttinum hevur hátturin sínar styrkir og fyrimunir. Gransking vísir, at tað er ein greiður samanhangur millum inntøkur og fátækradømi[13], og inntøkukanningarnar geva eisini yvirskipað eina eftirfarandi mynd av lutfalsliga fátækradøminum. Men kanningin skal ikki brúkast einsamøll til at siga, hvør er fátækur og ikki fátækur. Atfinningarnar móti inntøkuháttinum kunnu í ein ávísan mun vera rættar, tá talan er um at lýsa fátækradømi. Men endamálið við inntøkuháttinum er at vísa, hvussu nógv hava lægri inntøku enn tað, sum vanligt er í einum samfelag og vísir eitt lutfall millum landsins borgarar. T.v.s., endamálið er ikki at vísa, hvør hevur ráð til at fáa grundleggjandi tørvirnar nøktaðar, men hinvegin, sum tað verður orðað í okkara allýsing av fátækradømi, tað at kunna liva og virka á jøvnum føti við onnur í tí samfelagnum, sum ein er partur av.

### *50 % ella 60 % av miðinntøkuni*

Í ES, OECD og innan gransking er tað í høvuðsheitum 50 prosent markið, sum hevur verið brúkt í sambandi við máting av fátækradømi. Men eftir ES-toppfundin í Lissabon í 2000 samdust ES londini um at hækka markið til 60 prosent. Um tað er 50 prosent ella 60 prosent, sum verður brúkt, er ikki avgerandi í sambandi við samanbering millum lond, tí lutfallið millum londini broytist ikki munandi, tá markið verður flutt.[14]

---

[11] Ein nærri lýsing av javnvirðisinntøku kann síggjast á www.hagstova.fo
[12] En dansk fattigdomsgrænse, Rådet for Socialt Udsatte m.fl., 2010
[13] Samfundsøkonomen nr. 5 2010
[14] Fattigdom i EU-landene, Finn Kenneth Hansen, CASA 2010

Norðurlendsku londini skara framúr samanborið við onnur lond við færri fólkum í fátækraváða. Men gomlu eysturevropeisku londini klára seg eisini lutfalsliga væl í hesum samanberingum, hóast hesi londini hava víðfevndar trupulleikar við fátækradømi. Orsøkin til, at hesi londini klára seg væl í hagtølum eftir inntøkuháttinum, er, at tey ikki hava stóran ójavna í inntøkubýtinum, og tískil sær sbrt. inntøkuháttinum út til, at hesi londini ikki hava trupulleikar av størri týdningi við fátækradømi. Men onnur hagtøl frá Eurostat vísa, at borgarar í eysturevropeisku londunum í nógv størri mun uppliva fátækradømi, enn borgarar í norðurlondum gera tað.[15]

Í londum við lutfalsliga lítið útbreiddum fátækradømi, sum t.d. norðurlondum, er tað meira viðkomandi at brúka 50 prosents markið, tí við lægra markinum verður bólkurin av fátøkum avmarkaður og lættari at eyðmerkja. Tað skal í tí sambandi eisini nevnast, at í *Nordisk Statistisk Årbog* er eitt yvirlit við 50 prosents markinum, meðan 60 ikki verður brúkt.

Danska serfrøðinganevndin, sum í juni 2013 handaði donsku stjórnini tilmæli um eitt danskt fátækramark, brúkar 50 prosent av miðinntøkuni sum fátækramark. Grundgevingin fyri, at danska serfrøðinganevndin mælir til at brúka 50 prosent heldur enn 60 prosent markið, er m.a., at greiningar av fátækradømi sambært búsketthháttinum stuðla undir at brúka 50 prosent markið.

Londini veita hagtøl við 60 prosentum til Eurostat, sum er evropeiska hagtalssamstarvið. Mett verður, at eitt mark á 60 prosent betri endurspeglar veruleikan í ES londunum samlað sæð, men í mun til norðurlond er 50 prosent meiri hóskandi.[16]

Hagstovan framleiðir árlig hagtøl, har markið er 60 prosent, sum er í tráð við hagtølini, sum verða framleidd í ES-høpi.

## Búsketthátturin

Búsketthátturin vísir, hvørjar útreiðslur eitt húski skal hava fyri at kunna nøkta ein grundleggjandi, neyðugan og sosialt aksepteraðan tørv. Tað vísir, hvat eitt húski skal brúka – eina "kurv" av vørum, sum er neyðug fyri at kunna hava eitt lív á einum ávísum støði. Innihaldið í kurvini er treytað av, hvussu húskið er samansett – t.v.s. hædd verður tikin fyri aldri, kyni, lívsstøðu o.s.fr.

Búsketthátturin er ítøkiligur og lættur at fyrihalda seg til. Tað, sum vørurnar í kurvini kosta, er tað, sum er eitt fátækramark. Hinvegin vil tað altíð vera ein subjektiv meting, hvat ein kurv skal innihalda. Ein grundleggjandi spurningur er, um búskettið skal nøkta ein varandi tørv, ella um talan er um eitt styttri tíðarskeið. Tá tað er eitt styttri tíðarskeið, verða t.d. nýíløgur ikki tiknar við, tí talan er um eina fyribils støðu, sum væntandi broytist. Tá talan er um varandi tørv, er neyðugt við einum búsketti, sum

[15] Eurosat, EU-SILC
[16] Fattigdom i EU-landene, Finn Kenneth Hansen, CASA 2010

inniheldur tær útreiðslur, sum eitt húski hevur brúk fyri gjøgnum eitt ár, og eigur kurvin at taka hædd fyri, at útreiðslur ikki kunnu bíða.

Búsketthátturin er sum nevnt einfaldur og kann forklárast, soleiðis at skilja at talan er um eina røð av vørum og tænastum, sum í hvørjum einstøkum føri eru valdar til ella frá. Vansin við búskettháttinum er, at tað er ein subjektiv meting, hvat eitt rímiligt og sosialt aksepterað livistøði er. Tað er í stóran mun ein politiskur spurningur, á hvørjum støði eitt búskett skal vera á – t.v.s. á hvørjum støði eitt húski skal liva. Tað kann vera eitt minstabúskett, sum nøktar eitt lív á einum sosialt aksepteraðum støði, og ikki so nógv aftrat. Ella eitt standardbúskett – t.v.s. nokk til at hava eitt lív áleið á støði við onnur. Er talan um eitt treytaleyst minstamark, er talan um nakrar objektivar fortreytir, sum t.d. tað, sum er heilsuliga forsvarligt v.m., og er tað ikki viðkomandi at viðgera í hesum sambandi.

### *Standardbúskett*

Í t.d. Norra, Svøríki og Danmark verða árliga gjørd standardbúskett fyri ymsar familjustøddir. Norðurlond samstarva um hetta arbeiðið soleiðis at skilja, at tey brúka nakrar meginreglur, sum eru felags, men har standardbúskettið síðani verður tillagað til lokal viðurskifti í einstaka landinum. Standardbúskettini byggja á nágreiniligar kanningar av brúksmynstrunum hjá húskjunum í landinum. T.v.s., hvat er vanligt í so at siga øllum lívsins viðurskiftum? Hvussu nógv hava bil, og hvussu langt koyra borgarar, hvussu nógv gjalda limagjald til frítíðarfelagsskapir, og hvussu er brúksmynstrið av klæðum o.s.fr. Tá tað kemur til mat, so verður búskettið gjørt samsvarandi ráðum frá kostserfrøðingum, tá tað kemur til nýtslu av vaskipulvuri, so er tað samsvarandi viðmældu skamtanini. Tað vil siga útreiðslur til allar brúkslutir, sum slítast, og sum skulu endurnýggjast, so sum seingjarklæðir, gardinur, hvítvørur, sjónvarp. Fyri hvørja vøru verður árligi kostnaðurin roknaður út. Hetta verður gjørt við at deila mettu livitíðina hjá vøruni upp í kostnaðin, og harvið fæst ein árligur kostnaður. T.v.s., at standardbúskettið byggir á eina langa røð av kanningum og tilmælum, og tí krevur hetta rættiliga nógvar ressursir.

Tað er ikki soleiðis, at eitt standardbúskett verður framleitt frá grundini einaferð um árið. Til tað er arbeiðið ov víðfevnt, og byggja árligu búskettini tí á framskrivingar frá árinum frammanundan. Í Danmark var fyrsta og einasta standardbúskettið framleitt av einum bólki av granskarum longu í 1993, og varð hetta endurskoðað í 2001. Innihaldið í vørukurvuni er ikki broytt síðani 2001.

Danska búskettið, sum m.a. verður brúkt av danska serfrøðingabólkinum um fátækramark, sum handaði stjórnini eitt álit í juni 2013, stavar sostatt frá 2001, men er framskrivað til 2011 samsvarandi lønarvøkstrinum. Hetta, hóast nýtslumynstrið er broytt á nógvum økjum síðani tá. T.d. inniheldur danska búskettið útreiðslur til hald av dagbløðum og útreiðslur til ein sokallaðan disc-man, meðan fartelefon, internet o.tíl. sum hava munandi størri leiklut í dag, ikki er tikið við í búskettið.

### *Minstabúskett*

Standardbúskettið hevur ikki í sær sjálvum nakað við fátækradømi at gera, tí standardbúskettið inniheldur útreiðslur til alt forbrúk hjá eini vanligari familju – harímillum ferðing, at eta á matstovum, nýtsla av alkoholi, uppsparing o.a., sum vanliga ikki verður sett í samband við fátækradømi. Sambært danska standardbúskettinum hevur eitt par við 2 børnum mánaðarligar útreiðslur á 27.533 kr. umframt bústaðarútreiðslur. T.v.s., at hendan familjan skal hava eina lønarinntøku á 50-60.000 kr. um mánaðin (treytað av bústaðarútreiðslunum) fyri at kunna hava eina tilveru svarandi til standardbúskettið.

Eitt minstabúskett byggir á standardbúskettið, men har ein røð av vørum og tænastum eru lúkaðar frá. Við minstabúskettinum er tað í høvuðsheitum soleiðis, at útreiðslur til brúkslutir, sum hava livitíð upp á longri enn eitt ár, ikki eru tiknar við. Eitt minstabúskett inniheldur ikki útreiðslur til meira enn tað, sum verður mett neyðugt. Tí kann t.d. ein bilumvæling, ein størri tannviðgerð o.m.a. lættliga taka fíggjarliga grundarlagið undan eini familju, sum einans hevur tøka fíggjarliga orku, sum svarar til eitt minstabúskett.

Tey, sum í einum styttri tíðarskeiði hava fíggjarliga avmarkaðar ressursir, kunnu velja at bíða við ymiskum útreiðslum, so sum klæðir, og tí kann tað setast spurnartekin við, í hvussu stóran mun útreiðslur til klæðir skulu takast við í eitt minstabúskett. Sæð yvir eitt longri tíðarskeið eiga allar neyðugar útreiðslur hjá einum húsarhaldið at takast við í eitt búskett, heilt niður í smálutir. Men hjá londum, sum brúka minstabúskettið, er tað einans stutttíðarbúskettið, sum verður brúkt í almennum høpi – t.v.s. ongar langtíðaríløgur eru tiknar við. Havast skal í huga, at hjá vanligum familjum hevur desembermánaði við sær munandi eykaútreiðslur og t.d. eisini ein barnaføðingardagur. Minstabúskettið, sum onnur lond brúka tað, tekur ikki hædd fyri hesum slagi av útreiðslum.

Í mun til eitt standardbúskett er minstabúskettið ikki í sama mun ástøðiliga grundað.[17] Standardbúskettið er, sum nevnt omanfyri, grundað á eina røð av kanningum og serfrøðingatilmælum, meðan endamálið við einum minstabúsketti er at lýsa eitt slag av minsta marki á livistøði. Eitt minstamark á livistøði er eitt normativt hugtak, sum tað í stóran mun eru ymiskar fatanir av. Tá tað kemur til mat, persónligt reinføri, transport o.tíl., byggir minstabúskettið í stóran mun á standardbúskettið, men avbjóðingin liggur í sosialum viðurskiftum og luttøku í samfelagslívinum.

Tað ber ikki til at gera eitt minstabúskett, sum er umboðandi fyri allar Føroyar og allar familjur. Hvør familja hevur ein individuellan tørv, sum eitt búskett ikki tekur hædd fyri. Í pørtum av landinum er neyðugt at hava bil, meðan til ber í Tórshavn at brúka ókeypis bussleið. Nøkur eta og forbrenna meira enn onnur, nøkur hava sukursjúku, nøkur íðka ítrótt og hava útreiðslur til útgerð og limagjøld, nøkur hava brillur, brúka

[17] "At eksistere eller at leve" Fattigdom og lave indkomster i Danmark – hvordan måler man fattigdom?, Hansen og Hansen, 2004

hoyritól, eru skallut og tørva ikki útreiðslur til frisør o.m.a. Harnæst er lutfalsliga stórur munur á liviháttinum í ymsu økjunum í Føroyum. Fólk á smærri plássum hava kanska í størri mun enn t.d. í Tórshavn atgongd til ikki-handilsligt matískoyti. Tað, sum er óvanligt á smærru plássunum og á útoyggj, er kanska vanligt í meginøkinum. T.d. eru møguleikar fyri frítíðarítrivum stórir í Tórshavn og avmarkaðir t.d. á smáplássum. Ein familja við tveimum børnum í Tórshavn, sum leika hondbólt í hondbóltsfelagnum H71 og fótbólt í fótbóltsfelagnum HB, skal brúka uml. 300 kr. um mánaðin í limagjøldum fyri børnini. Sama familja skal á Tvøroyri gjalda minni enn helvtina fyri fótbólt og flogbólt við TB, meðan møguleikin kanska ikki er til staðar í Kunoy.

Útreiðslur til bústað og viðlíkahald av bústaði eru ikki við í standard- og minstabúskettinum í hinum norðurlondunum. Tað er ikki gjørligt at áseta eina rættvísandi upphædd, tí munurin á útreiðslunum á smáplássum og størri býum er alt ov stórur, umframt at munurin millum ymsu búhættirnar er stórur eins og tann veruleikin, at fólk, sum eru nýggj á bústaðarmarknaðinum, vanliga hava munandi hægri bústaðarútreiðslur enn enn tey, sum í longri tíð hava verið á bústaðarmarknaðinum. Hetta er eisini galdandi í Føroyum.

## Føroyska minstabúskettið

Sum nevnt er hátturin, sum verður brúktur aðrastaðni í sambandi við minstabúskettið, grundaður á standardbúskettið. Hetta háttalagið hava vit ikki møguleika at brúka í Føroyum, tí kanningar og serfrøðingatilmæli, sum taka støði í føroyskum viðurskiftum, og sum skulu brúkast í einum standardbúsketti, eru ikki til, og tí ber ikki til í verandi støðu at gera eitt føroyskt standardbúskett. Í sambandi við arbeiðið við einum føroyskum fátækramarki hava vit tí gjørt eitt føroyskt minstabúskett við íblástri frá fyrst og fremst tí danska, men eisini tí norska og svenska minstabúskettinum, men hava tikið viðkomandi serføroysk viðurskifti við.

Av tí at vit ikki hava sama grundarlag undir minstabúskettinum, eru nøkur fyrivarni, sum havast skulu í huga. Útlendsku búskettini hava sum nevnt eisini síni fyrivarni, sum eisini eru galdandi í Føroyum, so sum at talan er um eina familju, sum er lýst ástøðiliga, og at tað helst ikki finst nøkur familja, sum neyvt kennir seg aftur í búskettinum. Harumframt hava vit í einstøkum førum flutt nøkur útlendsk og partvíst ókend viðurskifti til Føroya, sum t.d. nýtsla av mati, nýtsla av reinførisvørum og vanligar húsarhaldsvørur. Hinvegin hava vit í sambandi við útreiðslur til samskifti, frítíð, ferðaútreiðslur o.a. gjørt egnar metingar.

Talan er um eitt stutttíðarbúskett, har tað ikki er tikin hædd fyri eykaútreiðslum, sum allar familjur við jøvnum millumbilum hava. Tað verið seg ein bilumvæling, eitt køliskáp skal skiftast, ein burturblivin fartelefon, o.s.fr. Taka vit familjur, sum eru illa fyri sosialt, so er ikki óvanligt, at hesi hava óstøðug bústaðarviðurskifti, og at neyðugt er at flyta við jøvnum millumbilum, sum aftur hevur við sær serligar útreiðslur. Minstabúskettið vísir vegleiðandi, hvat tað kostar at liva, tá tað einans er tikin hædd fyri

útreiðslum til grundleggjandi vørur so sum mat, klæðir, persónligt reinføri, vanligar húsarhaldsvørur, samskifti, flutning umframt nakað av útreiðslum til frítíð og undirhald.

Niðanfyri síggjast upphæddirnar, sum ein familja skal hava í tøkari inntøku fyri at kunna liva sambært minstabúskettinum. Í búskettinum eru fleiri útreiðslur, ið falla árliga – tað kann vera at keypa skógvar ella at gjalda limagjald fyri børnini til ítróttarfelag o.a. Í búskettinum eru hesar útreiðslur býttar á 12 mánaðir. T.v.s. einir skógvar, ið kosta 1.000 kr., kosta 83 kr. um mánaðin. Í veruleikanum er gerandisdagurin hjá flestu fátøkum familjum soleiðis, at tað ikki er gjørligt at raðfesta á ein slíkan hátt, at 83 kr. verða lagdar til síðis fyri at kunna keypa einar skógvar um eitt ár. Tað merkir so eisini, at minstabúskettið ikki er veruleikin, sum nógvar fátækar familjur liva í. Hetta búskettið skal síggjast sum tað, sum skal til fyri at fáa ein gerandisdag til at hanga saman, tá ongir snávingarsteinar liggja í vegin.

Støddin á búskettinum er treytað av, hvussu húskið er sett saman. Mánaðarligu útreiðslurnar síggjast niðanfyri (búståðarútreiðslur skulu leggjast aftrat):

| | |
|---|---|
| Støk kvinna | 6.966 kr. |
| Par uttan børn | 9.986 kr. |
| Støk kvinna við einum barni (4 ár) | 9.166 kr. |
| Støk kvinna við tveimum børnum (4 og 12 ár) | 11.563 kr. |
| Par við tveimum børnum (4 og 12 ár) | 14.267 kr. |
| Par við 4 børnum (2, 6, 10 og 14 ár) | 19.074 kr. |
| Stakur fólkapensjónistur | 6.295 kr. |
| Par fólkapensjónistar | 9.222 kr. |

Tað skal viðmerkjast, at fyri allar bólkarnar omanfyri eru útreiðslur til bil tiknar við, og er hetta størsta orsøkin til, at føroyska minstabúskettið er nakað hægri enn eitt minstabúskett í grannalondunum. Men eisini hóast ferðaútreiðslur ikki eru við, so er føroyska minstabúskettið eitt sindur hægri enn í hinum norðurlondunum.

Útreiðslur til ferðing í Føroyska minstabúskettinum eru umleið 2.500 kr. um mánaðin, sum fevnir um allar útreiðslur til ein tann bíligasta bilin á føroyska marknaðinum í dag. T.v.s. íløga (fíggjað yvir 7 ár, har ein 7 ára gamal bilur av sama slag gongur inn í keypið), viðlíkahald, kaskotrygging og brennievni. Í hinum londunum eru útreiðslur til almennan ferðaflutning tiknar við, og er tað á einum munandi lægri støði enn útreiðslur til bil. T.d. í danska minstabúskettinum eru útreiðslur til almennan ferðaflutning 770 kr. um mánaðin. Av tí at møguleikarnir at flyta seg frá einum staði til eitt annað við almenna rutunetinum eru avmarkaðir í mun til størru býirnar í grannalondunum, er tað hjá nógvum familjum í Føroyum neyðugt at hava bil fyri at kunna hava ein innihaldsríkan gerandisdag. Men tað er ikki alneyðugt hjá øllum. Sostatt skal upphæddin omanfyri ikki síggjast sum eitt minstamark hjá øllum – serliga við atliti at útreiðslum til ferðaflutning, tí tað er lutfalsliga stórur partur av samlaða búskettinum til ein stakan persón uttan børn.

Sum tað sæst omanfyri, so er búskettið hjá einum fólkapensjónisti eitt sindur lægri enn hjá einum persóni, sum ikki er fólkapensjónistur. Útgangsstøðið fyri metingini er, at fólkapenjónistar:

- ikki eru virknir á arbeiðsmarknaðinum,
- eru meira siðbundnir brúkarar av klæðum o.t., og
- ikki hava serligar avbjóðingar í mun til aðrar borgarar – t.v.s. hava ikki útreiðslur til heilivág o.tíl.

Í teimum førum, treytirnar omanfyri eru galdandi, hevur ein danskur serfrøðingabólkur mett, at fólkapensjónistar hava eitt sindur lægri útreiðslur til mat- og drekkivørur, og hava eitt sindur lægri útreiðslur til klæðir.[18]

Minstabúskettið er býtt í hesar høvuðsbólkar:

- Matur og drekkivørur
- Klæðir og skógvar
- Persónlig røkt
- Aðrar húsarhaldsvørur
- Samskifti
- Frítíð
- Ferðing

*Matur og drekkivørur*
Matur og drekkivørur er tað økið, sum í føroyska minstabúskettinum hevur serlig fyrivarni, tí vit hava ikki gjørt egnar prískanningar og hava ikki tikið atlit at serføroyskum viðurskiftum. Vit hava hildið okkum til donsku kostráðini, og sostatt eru tað somu vørurnar, ið eru við í danska og føroyska matbúskettinum. Vit hava ikki mett tað vera rætt at taka við, at tað møguliga eru fleiri húski í Føroyum, sum javnan fáa ókeypis matískoyti, ella sum hava jørð, seyð o.a. At ásett eitt miðal tal hevði ikki verið rætt, tí nógv húski eru, sum onki fáa, meðan onnur fáa nógv. Fortreytin fyri hesum matbúskettinum er, at allur matur til allar máltíðir verður keyptur.

Hesin parturin av búskettinum er tann mest víðfevndi, tá tað kemur til tal av vørum. Tað er soleiðis, at tað er lítil munur á standardbúskettinum og minstabúskettinum, tá tað kemur til matvørur. Búskettið heldur seg til sunnan og fjølbroyttan mat eftir kostráðum hjá kostráðgevum og t.d. til viðmælið um at eta 600 g. av frukt og grønmeti um dagin. Høvuðsmunurin millum standardbúskettið og minstabúskettið er, at eitt húski sambært standardbúskettinum etur á matstovu við jøvnum millumbilum, umframt at peningur er settur av til rúsdrekka. Hetta er ikki tikið við í minstabúskettið.

[18] "At eksistere eller at leve" Fattigdom og lave indkomster i Danmark – hvordan måler man fattigdom?, Hansen og Hansen, 2004

Í útlendsku búskettunum er mett neyvt um, hvussu matsamansetingin er hjá ymsum aldursbólkum, hjá kvinnum og monnum, hjá gomlum og børnum. Hetta gevur eitt ógvuliga víðfevnt yvirlit, sum vit í Føroyum ikki hava kannað.

Sum nevnt hava vit í hesum føri tikið støði í danska matbúskettinum og lagt 25 prosent aftrat. Í donsku prískanningunum er tað listaprísur, sum er galdandi. T.v.s., at tað eru ikki tilboðsvørur í stórum donskum vøruhúsum, sum eru tiknir við. Tað eru vanligir prísur í landsfevnandi handilshúsum, sum eru galdandi. Munurin millum Føroyar og Danmark á matvøruprísum kemur serliga til sjóndar við, at í Danmark er gjørligt at keypa í stórum, og harvið serliga bíliga, í stóru vøruhúsunum. Men tað eru sum nevnt ikki hesir donsku prísirnir, sum eru galdandi.

*Ferðing*

Onnur stóra avbjóðingin í minstabúskettinum eru útreiðslur til ferðing. Í útlendskum minstubúskettum eru einans útreiðslur til almennan ferðaflutning tiknar við. Tað skal nevnast, at kostnaðurin á almenna rutunetinum er nakað dýrari í hinum norðurlondunum enn í Føroyum. Í Norra eru útreiðslurnar til ferðing ásettar til 530 nkr. um mánaðin, í Danmark er upphæddin 771 kr. um mánaðin, meðan Svøríki ikki hevur útreiðslur til ferðing við í minstabúskettinum. Í donsku og norsku upphæddunum eru útreiðslur til busskort og viðlíkahaldsútreiðslur til súkklur. Í Føroyum kostar eitt mánaðarkort millum Skálafjørðin og Tórshavn 400 kr. um mánaðin, meðan tey, sum búgva í Tórshavn kunnu brúka ókeypis bussleiðina.

Í Føroyum eru fortreytirnar at flyta seg øðrvísi og meira avmarkaðar enn í einum vanligum donskum býi, har t.d. handils- og tænastuveitingar vanliga eru tættari at einum bústaði, umframt at tað er vanligari og munandi meira høgligt at brúka súkklu. Harumframt hava vit í Føroyum ikki eins væl útbygt alment rutunet sum í størru býunum í grannalondunum. Vit meta tí, at hjá teimum við smærri børnum er í stóran mun neyðugt at hava bil. Ein partur av borgarum uttanfyri Tórshavnar økið eru somuleiðis tengd at bili fyri at kunna flyta seg frá einum staði til annað.

Kostnaðurin av at hava bil er sjálvandi treytaður av, hvør bilur verður valdur. Ein av bíligastu bilunum á føroyska marknaðinum í dag hevur ein nýprís á 127.000 kr. Um hesin bilurin verður fíggjaður yvir 7 ár, sum vanliga er longsta áramálið, sum bilasølurnar hava sum afturgjaldstíð, og um hædd er tikin fyri, at ein 7 ára gamal bilur av sama slag gongur inn í keypið, so eru útreiðslurnar av bilinum) – t.v.s. íløga og rakstur (brennievnið, viðlíkahald, vegskattur og trygging) - umleið 2.500 kr. um mánaðin. Í praksis er helst ógvuliga ymiskt, hvussu húski við avmarkaðum fíggjarligum ressursum gera viðvíkjandi bili. Fleiri klára seg kanska við einum bíligum brúktum bili og klára partar av viðlíkahaldinum sjálvi ella við hjálp frá familju ella kenningum, meðan onnur brúka autoriserað verkstað at skifta hvørja brostna peru. Fortreytirnar í føroyska minstabúskettinum byggja ikki á faktiska nýtslu av bili, tí tann vitanin finst ikki í Føroyum. Bilurin nevndur omanfyri er brúktur, meðan viðlíkahaldsprísirnir stava frá FDM. Koyrdir kilometrar eru úr 4000 km. árliga hjá einum støkum pensjónisti upp í

12.000 km. árliga hjá einum pari við fýra børnum. T.v.s., at útgangsstøðið er, at tað ikki verða koyrd longri strekkir millum bygdir dagliga.

*Klæðir*
Gingið verður út frá, at øll keypa vanlig brúksklæðir í vanligari góðsku. Klæðir, sum hava eina langa livitíð so sum stivlar, regnklæðir og ítróttaútgerð, eru ikki við í klædnabúskettinum hjá vaksnum. Heldur ikki eru veitsluklæðir tikin við. Gingið verður út frá, at ein vaksin persónur keypir hesi klæðir í einum ári:

- Eitt par av skóm á 1.000 kr.
- 1,5 pør av buksum á 600 kr.
- 2 blusur/skjúrtur á 400 kr.
- Ein vetrarjakka annaðhvørt ár á 1.000 kr.
- 2 sett av undirklæðum á 200
- Annað á 500 kr.

Børn hava ein størri tørv á at skifta út klæðir, tí tey partvíst vaksa úr teimum, og tí tey vanliga eisini slíta klæðini meira. Fyri børnini eru útreiðslur til gummistivlar, vetrarstivlar og vanligar skógvar, vetrarjakka, kavadrakt til smærru børnini, húgvu, vøttir, 3 pør av buksum, 4 blusur og undirklæðir tiknar við, og til størru børnini nakað av ítróttaútgerð tikin við.

Prísirnir á klæðunum eru frá klædnahandlum í Tórshavn.

*Samskifti*
Til samskiftisútreiðslurnar eru kringvarpsgjald, fartelefonhald á 299 kr. um mánaðin við fríari talutíð á 4 tímar og internethald + kopargjald á 473 kr. um mánaðin tikin við. Størru børnini brúka talutíð fyri 50 kr. um mánaðin. Útreiðslur til t.d. Televarpið og fastnettelefon eru ikki tiknar við.

*Persónlig røkt*
Her eru áleið tær somu vørurnar sum í danska búskettinum í somu nøgdum tiknar við. Vørurnar til persónliga røkt eru t.d. sápur, vætukrem, hárvørur, tannbustir, deodorant, rakiútgerð til menn og bind til kvinnur, fyribyrging til pør, húð- og kropsrøkt o.a. Til hendan partin eru eisini útreiðslur til eitt tannlæknaeftirlit um árið (eftirlit, tannreinsan og røntgenmynd), 4 ferðir til hárfríðkan um árið tiknar við (møgulig liting o.tíl. verður ikki gjørd á hárfríðkanarstovu). Eisini eru útreiðslur til brillur tiknar við. Gingið verður út frá, at brillurnar kosta 4.000 kr., og verða skiftar 4. hvørt ár.

*Húsarhaldsvørur*

Her eru vanligar húsarhaldsvørur tiknar við, sum t.d. gólvsápur, uppvask, vaskipulvur o.a. Eisini er innbúgvstryggingin við í hesum partinum.

*Frítíð*
Útreiðslur til frítíðarítriv, spøl o.a. eru ógvuliga ymiskar frá persóni til persón, og tí er hetta helst tann truplasti parturin at áseta upphædd á. Til ein vaksnan persón eru hesar mánaðarligu útreiðslur tiknar við:

- Svimjing aðru hvørja viku 45 kr. (prísur í Tórshavn við avsláttarkorti)
- Kvøldskúlaskeið í Tórshavnar kvøldskúla 60 kr. um mánaðin
- Gávur 150 kr.
- Vanlukkutrygging 67 kr.

Til børnini eru harumframt leikur fyri 100 kr. um mánaðin tiknar við umframt føðingardagur fyri 2.000 kr. um árið (tey vaksnu halda ikki føðingardag fyri sær sjálvum), 800 kr. um árið í limagjaldi til ítróttafelag fyri størri børn umframt 1.500 kr. um árið til ítróttaútgerð.

## Saknhátturin

Inntøkuhátturin og búsketthátturin kunnu kritiserast fyri ikki at geva eina faktiska mynd av korunum hjá einum persóni ella einum húski. Tað vil siga, hvat er tað, sum borgarin upplivir sum eina avmarking í sínari tilveru. Endamálið við saknháttinum er at staðfesta, hvørjir materiellir ágóðar og hvat sosialt virksemi er alment viðurkent at vera ein sjálvfylgja fyri at liva eitt lív á einum rímiligum støði.

Saknur merkir ikki at hava fíggjarligt rásarúm til at keypa tær vørur og luttaka í tí virksemi, sum tað er fólkslig semja um, at øll skulu hava møguleika fyri. Tað kann vera at halda føðingardag, keypa heilivág, tannlæknaviðgerð o.a. At definera, hvat er vanligt í einum samfelag, verður vanliga gjørt við spurnakanningum, har borgarar verða spurdir, hvat tey meina, at øll skulu kunna keypa og luttaka í. Ein annar háttur er, at serfrøðingar útnevna hesi viðurskifti, men tað er ikki vanligur háttur.

Útgangsstøðið er fíggjarstøðan hjá borgaranum, og um borgarin upplivir avmarkingar í mun til nøkur mát, sum eru sett upp frammanundan. Tað er borgarans egna uppliving av sakni, og tað vil siga, at hátturin í mun til inntøkuháttin og búsketháttin beinleiðis vísir, hvussu borgarin upplivir fátækradømi.

Tað hevur verið siðvenja í teimum skandinavisku londunum síðan miðskeiðis í 1970´unum at framleiða stórar spurnakanningar um livikorini hjá borgarunum, har fokus eisini hevur verið á subjektiv livikor, sum saknur er.

Síðani 2003 hava londini í tí evropeiska hagfrøðiliga samstarvinum samstarvað um árligu spurnakanningina “ Statistic on Income and Living Conditions” (SILC). Hetta er ein umfatandi spurnakanning, har nógvir tættir á tí sosiala økinum verða kortlagdir – m.a. búskaparlig støða, tilknýti til arbeiðsmarknað, saknur o.a. Í Danmark verða árliga 7250 fólk spurd og í Íslandi 4000 fólk. Tað kann sambært Hagstovu Føroya roknast við, at um ein slík kanning við øllum variablum skal gerast í Føroyum, er neyðugt, at talið

av spurdum er áleið sum í Íslandi. Í Íslandi fara árliga 4 ársverk til at framleiða SILC-kanningarnar.

Hagstovurnar í Danmark og Íslandi samla inn data til SILC og almannakunngera nakað av talvum, men er tað Eurostat, ið er hagstovan hjá ES, sum framleiðir og kunnger alt tilfarið, har øll ES lond eru við umframt Norra og Ísland.

Tá tað snýr seg um at máta fátækradømi, nýtir danska hagstovan upplýsingar úr SILC fyri at lýsa sakn hjá borgarum.[19]

Teir indikatorar, sum danska hagstovan roknar uppá fyri at máta álvarsaman materiellan sakn, eru:

- Hevur húskið verið afturút við at gjalda húsaleigu, rokningar fyri el og hita ella rentur og avdráttir av láni?
- Hevur húskið ikki ráð til 1 viku feriu um ári burtur frá egnum bústaði?
- Hevur húskið ikki ráð til eina máltíð av mati við kjøti, høsnakjøti, fiski ella líknandi annan hvønn dag?
- Klárar húskið ikki at gjalda eina óvæntaða rokning á 8.500 kr. uttan lántøku?
- Hevur húskið onga telefon grundað á búskaparliga støðu?
- Hevur húskið onki litsjónvarp grundað á búskaparliga støðu?
- Hevur húskið onga vaskimaskinu grundað á búskaparliga støðu?
- Hevur húskið ongan bil grundað búskaparliga støðu?
- Hevur húskið ikki ráð at hava nøktandi hita í bústaðnum?

Um svarað verður ja upp á í minsta lagi 3 av teimum 9 spurningunum, kemur ein undir at hava álvarsaman materiellan sakn.

Saknhátturin er fyrst og fremst avmarkaður av, at talan er um spurnakanningar, sum eru rættiliga víðfevndar og harvið eisini kostnaðarmiklar at fremja. Kanningar eftir saknháttinum verða ikki gjørdar í Føroyum. Hesar kanningar høvdu bøtt um vitanargrundarlagið um fátækradømi í Føroyum, og harvið eisini bøtt um grundarlagið undir møguligum politiskum átøkum.

[19] Levevilkår – måling af fattigdom, Danmarks Statistik 2012

# 4. Fátækramørk í øðrum londum

Sambært ST er ein persónur fátækur, um viðkomandi hevur minni enn 1,25$ at liva fyri um dagin. Hetta er ikki viðkomandi fyri tey framkomnu londini, sum vit meta okkum at vera part av, og verður hetta mest brúkt í menningarlondum. Tí síggja vit í hesum partinum burtur frá hesum slagi av fátækramarki.

Føroyar hava ikki havt eitt alment fátækramark. Umrøðan í almenninginum av tí manglandi fátækramarkinum í Føroyum kann geva ta fatan, at Føroyar eru aftanfyri onnur framkomin lond, tí vit ikki hava eitt fátækramark. Men so er ikki – í øðrum framkomnum londum í vesturheiminum eru tað einans Stórabretland og Írland, sum hava almenn fátækramál, og í juni í 2013 er Danmark komið aftrat við einum almennum fátækramarki. Í øðrum londum eru ymsir felagsskapir, granskingarstovnar, kommunur og onnur, sum hava gjørt sínar egnu metingar og mát fyri fátækradømi, men talan er ikki um almenn fátækramørk.

Hinvegin hava onnur lond ymisk mát fyri fátækradømi, og verður hetta máti vanliga gjørt av hagstovunum í einstøku londunum. Londini brúka tó flest øll í ein ávísan mun inntøkuháttin – og tað vil siga, at talan er um fólk í fátækraváða, sum verður brúkt, og í tí sambandi skal nevnast, at hetta mátið hevur Føroyar eisini havt síðan 2011.

Nøkur lond hava eina upphædd fyri lægstu sosialu veitingarnar, sum byggir upp á eitt slag av búskettmodellið – eitt nú Svøríki, sum á hvørjum ári ásetir sokallaða "riksnormen", sum verður brúktur til at áseta tær lægstu sosialu veitingarnar, og sum er ein upphædd, sum mett at vera neyðug fyri at kunna liva heilsuliga ráðiligt.

Í USA var upprunaliga fátækramarkið ásett fyri 40 árum síðani, og var markið tá mett at vera á einum nøktandi sosialt aksepteraðum støði. Men markið er ikki tillagað í takt við menningina í samfelagnum, og markið er í dag at líkna við eitt treytaleyst fátækramark og nøktar einans basalum kropsligum tørvi.

Tað er ikki soleiðis, at londini hava eitt minstamark, sum skal tryggja borgarum eitt lív, sum verður mett at vera á einum støði, sum er rímiligt og sosialt aksepterað. Sum nevnt brúka nøkur lond eitt slag av búskettmodelli fyri lægstu sosialu veitingarnar, men í hesum londum eru sosialu veitingarnar á einum støði, sum er lægri enn tað, sum vit kenna úr Føroyum.

Londini brúka fyrst og fremst fátækramørkini sum eitt mát, soleiðis at tey kunnu fylgja gongdini í talinum av fátøkum. Tey flestu londini brúka sum nevnt ikki eitt ávíst mark, sum borgarar skulu lyftast upp um, og í teimum londum, sum brúka háttin til at áseta lægstu sosialu veitingarnar, eru hesar veitingar lágar.

Niðanfyri verður í stuttum greitt frá fátækramørkum í ymiskum útvaldum londum.

## Norra

Eins og í øðrum londum verður inntøkuhátturin brúktur í Norra, men hetta er ikki eitt alment norskt fátækramark. Norra hevur ikki eitt alment fátækramark – hvørki nationalt ella kommunalt. Tá norska stjórnin í 2006 legði fram eina heildarætlan móti fátækradømi, varð staðfest, at fátækradømi er ein samansettur trupulleiki, sum ikki er hóskandi at seta upp við eini allýsing ella einum marki.[20]

Sum nevnt er tað inntøkuhátturin, sum verður brúktur (við 50 prosent av miðinntøkuni), men eisini verða mált uppá livikorsindikatorar, men norskir myndugleikar eru varnir við at brúka úrslitini, tí víst verður á, at indikatorarnir verða ávirkaðir av viðurskiftum so sum konjunkturum, viðurskiftum á arbeiðsmarknaðinum o.ø. og ikki geva eina haldgóða mynd av fátækradøminum.

Tær lægstu sosialu veitingarnar verða roknaðar við útgangsstøði í búsketthættinum. Tað er stovnurin *Statens institutt for forbruksforskning*, sum hevur mett um minstamarkið, sum fleiri kommunur brúka í sambandi við hesar veitingar.

Norska arbeiðs- og vælferðarumsitingin “NAV” gevur út árliga eina frágreiðing við eini presentasjón av øllum almennum hagtølum, sum viðvíkja fátækra- og livikorsviðurskiftum.

Norska stjórnin fór í 2007 undir eina tilgongd um at minka fátækradømi. Tilgongdin byrjaði við, at sett vórðu nøkur mál, sum vóru:

1. øll skulu hava møguleika fyri at arbeiða,
2. øll børn og ung skulu hava møguleika at vera partur av samfelagnum og at menna seg,
3. livikorini hjá teimum við sosialum trupulleikum skulu betrast.

Arbeitt hevur verið víðari við hesum málum, og í 2011 legði stjórnin fram eina langskygda strategi um at javna fíggjarligar og sosialar munir í Norra. Men hetta er ikki knýtt at einum ávísum fátækramarki. Málini skulu røkkast við, at fleiri skuldu gerast partur av arbeiðsmarknaðinum, og hetta skal gerast við fyribyrgjandi tiltøkum, sum serliga eru knýtt at dagstovna- og útbúgvingarøkinum og arbeiðsmarknaðarpolitikki.[21]

## Svøríki

Svøríki hevur ikki nakað alment fátækramark, og hevur heldur ikki nakra yvirskipaða strategi móti fátækradømi. Frá almennari síðu sæst tað víðfevnda sosiala trygdarnetið og arbeiðsmarknaðarpolitikkurin sum ein trygd fyri einum nøktandi livistøði. Í Svøríki verða gjørdar árligar frágreiðingar, sum fylgja gongdini í inntøkunum hjá borgarunum, og sum fylgja gongdini í inntøkubýtinum í samfelagnum, og eisini verða gjørdar árligar

[20] Handlingsplan mod fattigdom, Arbeids- og Inkluderingsdepartementet, 2006
[21] Kunnskap om fattigdom i Norge, FAFO-rapport 2011:21

livikorskanningar. Men talan er um generelt vitanargrundarlag, sum eisini verður brúkt sum grundarlag undir førdum politikki.

Svenski stovnurin Konsumentverket roknar á hvørjum ári sokallaða “riksnormen” út, sum verður brúkt sum grundarlag undir “ekonomisk bistånd”, sum svarar til føroysku forsorgarveitingina, og sum er lægsta sosiala veitingin í Svøríki. Riksnormen byggir á búsketttháttin og lýsir eitt minstabúskett hjá ymsum familjutypum. T.d. kann nevnast, at persónligu útreiðslurnar hjá einum støkum vaksnum persóni í 2013 sambært Riksnormen eru umleið 3.300 DKK um mánaðin.[22] Um talan er um tvey sambúgvandi, er upphæddin umleið 5.400 kr. um mánaðin. Tey, sum hava børn, fáa so eina hægri upphædd. Í hesum upphæddunum eru útreiðslur til:

- mat
- klæðir og skógvar
- frítíðarítriv
- persónligt reinføri
- vanligar gerandisvørur
- miðlaútreiðslur
- telefon
- ávísar tryggingar

Havast skal í huga, at upphæddirnar omanfyri ikki skulu samanberast við upphæddir í t.d. Føroyum, tí kostnaðarstøðið og keypsstyrkivirðið er ymisk í ymiskum londum.

## Ísland

Ísland hevur ikki nakað alment fátækramark, men tað hava verið gjørdar ein røð av størri og smærri verkætlanum, sum kanna livikorini hjá ymsum sosialum bólkum í Íslandi. Eisini veitir Ísland árliga hagtøl til evropeiska hagtalssamstarvið EU-SILC, sum inniber árligar livikorskanningar eftir saknháttinum. Sambært kanningum um inntøkubýtið í Íslandi er landið ógvuliga javnt, og sambært inntøkuháttinum eru fá fólk í fátækraváða. Men hjálparfelagsskapir vísa á, at fátækradømi er vanligari enn almennu hagtølini vísa.[23]

Íslendska stjórnin lat fyrst í 00’unun gera eina kanning av, hvat ein minstaupphædd til uppihalds skal vera, men t.d. sosialu veitingarnar eru ongantíð komnar upp á tað støðið, sum nevnda kanning vísti.

Áðrenn fíggjarkreppuna var fátækradømi í Íslandi avmarkað til fólk innan ymsar vælferðarskipanir, men kreppan hevur sum kunnugt havt við sær, at nógvir borgarar hava persónliga skuld v.m. Kanningar við inntøkuháttinum avdúka ikki, í hvussu stóran mun hetta ávirkar fíggjarligu korini hjá íslendingum. Úrslit eftir inntøkuháttinum vísa

[22] www.socialstyrelsen.se

[23] Hjálparstofnun Kirkjunnar and Reykjavík RED CROSS (2012). Farsæld (Report on new poverty and inclusion initiatives)

sum nevnt, at færri íslendingar eru í fátækraváða enn í hinum norðurlondunum. Men samstundis vísa kanningar eftir saknháttinum, at fleiri íslendingar hava trupult við at fáa fíggjarligu "endarnar at røkka" enn í hinum norðurlondunum.[24] Síðani fíggjarkreppan byrjaði í 2008, er parturin av teimum, sum hevur trupult at fáa endarnar at røkka saman, øktur munandi.

Hóast Ísland ikki hevur nakað fátækramark, so hevur íslendska stjórnin lagt dent á at avmarka árinini av fíggjarkreppuni í mun til fíggjarligu korini hjá húsarhaldunum við lægru inntøkunum. Talan er í Íslandi um ein generellan spurning um fordeiling og umfordeiling, ið ikki er knýttur at einum ávísum marki.

## Danmark

Danmark hevur í juni í 2013 fingið eitt alment fátækramark. Markið er ásett eftir inntøkuháttinum, og er ásett til at vera 50 prosent av miðinntøkuni. Fyri at vera undir markinum skal ein harumframt vera undir markinum í 3 ár.

Serfrøðingabólkurin, sum hevur arbeitt við markinum, vísir á, at tað finst ongin objektivur háttur at máta fátækradømi, og tí verður mælt til, at inntøkuhátturin verður suppleraður við kanningum eftir saknháttinum, umframt at víst verður á nakrar indikatorar fyri fátækradømi. So hóast at Danmark nú hevur fingið eitt fátækramark, sum er áljóðandi eina tøka árliga inntøku á 103.200 kr., so er hetta markið ikki endaligt.

Fátækramarkið í Danmark fer ikki í sær sjálvum at hava við sær, at tað verða færri fátøk, tí tað er ikki soleiðis, at øll tey, sum eru undir markinum, fara at fáa eina peningaupphædd, sum flytur tey upp um markið. Hetta er eisini í tráð við arbeiðssetningin, sum var grundarlag undir arbeiðinum við fátækramarkinum, at eitt mark ikki skuldi hava við sær t.d. hægri sosialar veitingar.

Hóast Danmark hevur fingið eitt alment fátækramark, so er ógreitt ítøkiliga, hvat markið skal brúkast til. Danski serfrøðingabólkurin mælir til, at tað árliga verður gjørd ein frágreiðing um fátækradømi í Danmark. Árliga frágreiðingin skal styrkja vitanargrundarlagið, málrætta politiskt fokus og perspektivera politisku átøkini. Men danska stjórnin hevur í september 2013 almannakunngjørt eina røð av sosialpolitiskum málum, sum skulu vera nádd í 2020,[25] og fátækramarkið og fátækradømi eru ikki partar av hesum málum.

[24] Eurostat, EU-SILC
[25] Alle skal med – målsætninger for de mest udsatte frem mod 2020, Socialministeriet 2013

## Írland

Írland er eitt av londunum, sum arbeiðir mest málrættað at forða fátækradømi, og sum eisini hevur eitt alment fátækramark.

Írland hevur eina allýsing av fátækradømi, sum er:

> *"People are living in poverty if their income and resources (material, cultural and social) are so inadequate as to preclude them from having a standard of living which is regarded as acceptable by Irish society generally. As a result of inadequate income and other resources people may be excluded and marginalised from participating in activities which are considered the norm for other people in society."*[26]

Hetta merkir, at tey, sum ikki hava fíggjarligar ressursir at liva tað lívið, sum verður mett vanligt í Írlandi, eru fátøk.

Ítøkiliga er fátækramarkið sett saman av inntøkuháttinum og saknháttinum. Tey, sum hava eina inntøku undir 60 prosent av miðinntøkuni, og samstundis hava upplivað sakn av nøkrum frammanundan defineraðum materiellum ágóðum, eru fátøk.

Írland hevur sett í verk eina heildarætlan um fátækradømi. Tað verður árliga gjørd ein frágreiðing, sum greinar gongdina í fátækradøminum, og stovnurin "Office for Social Inclusion" hevur ábyrgdina av, at heildarætlanin verður sett í verk sum ætlað.

Eins og í øðrum londum eru tað stakir uppihaldarar, sum eru fátøk í Írlandi. Forðingar, sum í Írlandi verða tiknar fram, og sum heildarætlanin skal bøta um, eru:[27]

- barnaansing er kostnaðarmikil, og tað avmarkar møguleikarnar hjá støkum foreldrum at fara undir útbúgving, sum kundi bøtt um møguleikarnar á arbeiðsmarknaðinum,
- avmarkað útboð av "familjuvinaligum" arbeiðsplássum,
- avmarkað fíggjarligt insitament at flyta seg úr sosialum bundinskapi til arbeiði,
- avmarkað útboð av bústøðum til tey, ið lítið eiga.

[26] www.welfare.ie
[27] www.cpa.ie

## Stórabretland

Stórabretland hevur eitt alment fátækramark, sum eins og tað danska markið hevur inntøkuháttin sum grundarlag, men markið skal somuleiðis supplerast við øðrum mátum. Mátini fyri fátækradømi eru:

1. Javnvirðisinntøkan er lægri enn 60 prosent av miðinntøkuni.
2. Mátið fyri varandi fátækradømi er ein inntøka, sum hevur verið lægri enn 60 prosent av miðinntøkuni í 3 av seinastu 4 árunum.
3. Serligt viðvíkjandi børnum: samanseting av lágari inntøku og sakni av materiellum ágóðum.
4. Saknhátturin.

Í Stórabretlandi hevur seinnu árini verið serligur dentur verið lagdur á barnafátækradømi, og í tí sambandi eru serlig mát ásett fyri hetta.

Árliga frágreiðingin Households Below Average Income[28] hevur til endamáls at lýsa gongdina við fátækradømi og er eitt grundarlag undir politiskum átøkum móti fátækradømi.

[28] Department for Work & Pensions, 2012

# 5. Inntøkuhátturin - føroysku úrslitini

Í Føroyum varð byrjað við hesum kanningum við støði í tølum fyri 2009. Nýggjastu tølini eru fyri 2011, og sostatt hava vit nú eina tíðarrøð upp á 3 ár. Vit fara ikki her at gera so nógv burturúr føroysku úrslitunum, tí tað er longu greitt frá teimum á heimasíðuni hjá Hagstovu Føroya.[29]

Fólk, sum kunnu hugsast at vera fátøk sambært inntøkuháttinum, eru eisini lesandi, sum hava ÚS sum lívsgrundarlag. Men sambært okkara allýsing er fátækradømi ikki ein sjálvvald støða, og harumframt skal talan vera um eitt longri tíðarskeið. So hóast lesandi sambært inntøkuháttinum eru í fátækraváða, so eru tey eftir okkara fatan ikki fátøk. Hetta skal ikki skiljast soleiðis, at børn hjá lesandi ikki eru í eini viðkvæmari støðu, tí, sum eisini verður víst á, so kann stutttíðar fátækradømi hjá børnum hava ávirkan á livikorini seinni í lívinum.

Sum áður nevnt, so eru tað serliga stakir uppihaldarar og fólkapensjónistar, sum í Føroyum hava verið tiknir fram at vera í serligum fátækraváða.

Fyri at vera fátækur skuldi árliga tøka inntøkan hjá støkum persónum í 2011 vera lægri enn 116.404 kr. Fólkapensjónistar, sum eru stakir, og sum ikki hava inntøku aftrat pensjónini, eru fátækir sambært inntøkuháttinum. Tøka inntøkan hjá einum støkum pensjónisti uttan aðra inntøku var í 2011 113.174 kr. (við miðal kommunuskattaprosenti), sum er umleið 3.200 kr. um árið lægri enn fátækramarkið.

Eitt húski, sum er sett saman av tveimum vaksnum uttan børn, skal tilsamans hava eina árliga tøka inntøku á 174.606 kr. fyri at vera yvir markinum. Sum dømi kann nevnast, at um tvey fólk skulu hava 174 tús. kr. í tøkari inntøku, krevst, at tey hava eina a-inntøku á knappliga 11.000 kr./mðr. áðrenn skatt í part, ella um annar hevur alla inntøkuna, so krevst ein a-inntøka á 25.000 kr./mðr. (við skattastiganum, sum var galdandi í 2011).

Pensjón til tveir giftar fólkapensjónistar er umleið 186.308 kr. eftir skatt og gjøld, og t.v.s. hægri enn fátækramarkið. Fólkapensjónistar, sum eru giftir við einum ikki-pensjónisti, og har hjúnafelagin hevur eina tøka inntøku lægri enn 7.000 kr. um mánaðin, falla eisini undir fátækramarkið.

[29] www.hagstova.fo

**Tal av fólkum, sum seinastu trý árini hava havt inntøku lægri enn 60 prosent av miðinntøkuni, býtt upp eftir aldri (2011)**

| | Tal av borgarum |
|---|---|
| 0-17 ár | 359 |
| 18-24 ár | 90 |
| 25-54 ár | 331 |
| 55-66 ár | 145 |
| 67+ | 630 |
| **Tilsamans** | **1.555** |

Kelda: Hagstova Føroya

Talvan omanfyri vísir talið av borgarum, sum í trý ár á rað hava havt inntøku lægri enn 60 prosent av miðinntøkuni. Talvan omanfyri er íroknað fólk í møguligari útbúgving, ið arbeiðsbólkurin metir ikki eri fátøk. Somuleiðis inniheldur talvan fólkapensjónistar, sum arbeiðsbólkurin í høvuðsheitum metir ikki eru fátøk (sí síðu 39).

Føroysku úrslitini í kanningini um inntøkubýtið eru einastandandi í mun til onnur lond. T.v.s., at hagtølini vísa, at færri fólk eru í fátækraváða Føroyum enn í øðrum londum, og tey, sum eru í fátækraváða, eru minni fátøk enn í øðrum londum. Men talið er økt tey 3 árini, sum hagtøl eru tøk fyri.

**Fólk í fátækraváða í prosent**

| | 2009 | 2010 | 2011 |
|---|---|---|---|
| **Føroyar** | 8,8 | 8,5 | 9,3 |
| **Danmark** | 10,2 | 9,8 | 13,0 |
| **Ísland** | 10,9 | 11,2 | 9,2 |
| **Noreg** | 13,1 | 13,3 | 10,5 |
| **Svøríki** | 13,8 | 13,1 | 14,0 |
| **Finnland** | 13,2 | 12,8 | 13,7 |
| **ES í miðal** | | | 16,9 |

Kelda: Hagstova Føroya

Talið av teimum, sum í Íslandi eru undir fátækraváðamarkinum, er í 2011 lægri enn í Føroyum. Árini frammanundan hevur talið í Íslandi verið nakað hægri enn í Føroyum. Talið av fólkum í Íslandi undir markinum er lækkað, meðan fíggjarkreppan hevur tikið til. Samstundis er talið av teimum í Íslandi, sum sambært saknháttinum eru fátøk, økt munandi.[30]

## Føroyski bústaðarmarknaðurin og inntøkuhátturin

Serliga er tað føroyski bústaðarmarknaðurin, sum hevur nøkur sereyðkenni, sum atlit skulu takast til, tá niðurstøðurnar frá inntøkukanningini verða víðariviðgjørdar.

Føroyski bústaðarmarknaðurin er eyðkendur við, at flestu borgarar búgva í egnum sethúsum. Útboðið av alternativum bústøðum er avmarkað til ein lítlan leigumarknað,

[30] EU-silc

sum er merktur av, at eftirspurningurin er størri enn útboðið. Tá talan er um bústaðir, sum eru hóskandi til fólk við børnum, er tað í flestu førum lutfalsliga dýrt at leiga í meginøkinum. Fíggjarligi munurin á at eiga og leiga er tá avmarkaður. Nøkur fólk hava avmarkaðar møguleikar at fáa fígging til eigarabústað, og tað merkir, at møguleikarnir at koma fyri seg á bústaðarmarknaðinum eru avmarkaðir, og tað at flyta út frá foreldrunum kann vera eitt langt lop – fíggjarliga.

Lutfallið millum talið av bústaðareigarum og leigarum er øðrvísi í Føroyum enn í øðrum londum, tí tað eru munandi færri leigarar í Føroyum, og harvið eisini fleiri eigarar. Sambært Manntal eru tað einans 15 prosent av fólkunum, sum búgva í leigubústaði, meðan 85 prosent av fólkunum búgva í eigarabústaði. Í hinum norðurlondunum er tað 40-60 prosent, sum eiga sín egna bústað.[31] Ein orsøk til munin er ivaleyst, at í Føroyum verður ongin stuðul veittur til fólk, sum leiga, meðan stuðul verður veittur fólki, sum hava bústaðarlán í egnum eigarabústaði.

Í Føroyum eru sum kunnugt ongir bústaðarskattir ella ognarskattir. Tá húsini eru niðurgoldin, hevur eitt húski í høvuðsheitum einans útreiðslur til viðlíkahald. At stuðul verður veittur til eigarabústaðir og ikki til leigubústaðir, og tann sannroynd, at tað ikki kostar at eiga sín bústað, merkir, at fíggjarligu insitamentini at eiga heldur enn at leiga eru størri í Føroyum enn í øðrum londum.

Men tað merkir samstundis, at alt annað líka er stórur munur á tiltøkupeninginum hjá teimum, sum eru nýggj á bústaðarmarknaðinum, teimum familjum, sum búgva í leigubústaði og so teimum, sum hava niðurgoldin hús, ella sum hava verið á bústaðarmarknaðinum í nógv ár (tó eisini treytað av landafrøðiligari staðseting, tí stórur munur er á bústaðarprísunum í ymsu økjunum).

Munurin á tiltøkupeninginum hjá eigarum og leigarum er alt annað líka størri enn í londunum, sum vit vanliga samanbera okkum við. Tey, sum í øðrum londum búgva í leigubústaði, hava sum kunnugt útreiðslur til húsaleigu, frároknað møguligan bústaðarstuðul (bústaðarstuðul verður veittur í flest øllum londum). Tey, sum eiga ein bústað, hava útreiðslur til bústaðarskattir. T.v.s. flest øll húskir hava okkurt slag av bústaðarútreiðslum, tó at bústaðarskattir tyngja eitt vanligt húskisbúskett lutfalsliga lítið í mun til eina leiguútreiðslu ella útreiðslur til rentur og avdrøg.

Vanliga er tað soleiðis í øðrum londum, at bústaðarskattir verða ásettir eftir virðinum av bústaðnum. Í økjum við høgum bústaðarprísum verða goldnir høgir bústaðarskattir og umvent í økjum við lágum bústaðarprísum. Tað sama er við prísum á leigumarknaðinum. Tað merkir, at í økjum við lágum bústaðarprísum er bíligt bæði at eiga og leiga, og í økjum við høgum bústaðarprísum er dýrt bæði at eiga og leiga. Ein eigari í t.d. Keypmannahavnarøkinum, rindar vanliga nakrar túsund kr. í *ejendomsværdiskat* og *grundskyld* um mánaðin, meðan bústaðarskattaútreiðslan í einum útjaðaraøki kann vera undir 1.000 kr. um mánaðin. Men har er samstundis eisini bíligari

[31] Housing and Housing Policy in the Nordic Countries, Lujanen 2004

at búgva til leigu. T.v.s., at munurin millum at eiga og leiga er minni enn t.d. í Føroyum.

Tað eru júst útreiðslur til bústað, sum vanliga er størsti einstaki parturin í einum húskisbúsketti. Í miðal brúkar eitt húski í hinum norðurlondunum millum 19 og 26 prosent av øllum útreiðslum upp á bústaðarútreiðslur.[32] Hetta er sum nevnt eitt miðal tal, so um parturin hjá einstøku familjuni er 15, 30 ella 40 prosent, er sjálvsagt treytað av, um talan er um eigarabústað, leigubústað, støddina á skuldini o.s.fr.

Sambært kanningini hjá Fólkaheilsuráðnum[33] brúka føroyingar 20,2 prosent av tøku inntøkuni til býli, men føroyski bústaðarmarknaðurin er sum nevnt øðrvísi háttaður enn í grannalondunum, og eitt føroyskt miðaltal hevur tískil ikki sama nyttuvirði. Sum nevnt omanfyri er størri munur í Føroyum millum tey, sum ikki hava skuld í sínum eigara bústaði, og øðrum.

Sambært kanningini um livikorini hjá fólkapensjónistum eru tað 84 prosent av øllum pensjónistum, sum hava 0 kr. í útreiðslum til húsalán ella húsaleigu. Upplýsingar um, hvussu stórur partur av t.d. barnafamiljum ikki hava útreiðslur til húsalán ella húsaleigu, eru ikki tøkar, men sannlíkt er, at flestu ungar familjur hava hesar útreiðslur. Miðalprísurin á húsum í Tórshavnar økinum er umleið 2 mió. kr., meðan miðalprísurin í restini av landinum er umleið 1 mió. kr.[34]

Eitt bústaðarlán upp á 1 mió. kr. yvir 25 ár við rentu á 3,75 prosent gevur eina mánaðarliga nettoútreiðslu (t.v.s. íroknað rentustuðul) upp á umleið 4.200 kr., meðan eitt bústaðarlán upp á 2 mió. kr. við somu treytum gevur eina mánaðarliga nettoútreiðslu upp á uml. 8.500 kr. Úrslitini í inntøkuháttinum taka ikki hædd fyri, at stórur munur er á útreiðslum til bústað hjá ymsum familjum, og eru tað yngri fólk, sum í munandi størri mun hava bústaðarútreiðslur.

Verður hædd tikin fyri bústaðarútreiðslum, so verður markið fyri fátækraváða variabult – treytað av bústaðarútreiðsluni. Ein stakur persónur uttan børn skal sum nevnt hava eina tøka árliga inntøku upp á 116.404 kr. fyri at vera omanfyri fátækraváðamarkið. Um hesin persónurin hevur bústaðarútreiðslur á 5.000 kr. um mánaðin, skal árliga tøka inntøkan vera 60.000 kr. hægri fyri at hava somu nýtslumøguleikar, sum ein persónur uttan bústaðarútreiðslur.

Inntøkurnar hava sjálvsagt stóran týdning fyri nýtslumøguleikarnar, men nýtslumøguleikarnir eru í ein ávísan mun eisini tengdir at bústaðarútreiðslum, umframt øðrum viðurskiftum so sum ognum, atgongd til annað tilfeingi o.tíl. Tað eru sum nevnt tveir bólkar, sum eru yvirumboðaðir í hagtølum yvir fátøk í Føroyum, og eru tað stakir fólkapensjónistar og stakir uppihaldarar. Kanningin hjá Hagstovuni um inntøkubýti vísir, at inntøkugloppið hjá fólkapensjónistunum í 2011 er 5,7. T.v.s., at miðalinntøkan hjá teimum fólkapensjónistum, sum eru undir váðamarkinum, er 5,7 prosent niðanfyri

---

32 http://www.oecdbetterlifeindex.org/topics/housing/
33 Føroyar besta land í heiminum, Fólkaheilsuráðið 2013
34 http://www.eik.fo

markið. Hjá teimum børnum, sum eru undir markinum, er inntøkugloppið umleið 17 prosent.

Ein stakur fólkapensjónistur uttan aðra inntøku enn fólkapensjón og samhaldsfasta hevur umleið 9.850 kr. um mánaðin eftir skatt og gjøld. Sum vit koma inn á niðanfyri, so hevur ein partur av støkum uppihaldarum bert møguleika at koma upp á í mesta lagi 12.200 kr. eftir skatt og gjøld. Harumframt skal barnafrádráttur leggjast aftrat (uml. 1.000 kr./mðr. pr. barn). T.v.s. í mesta lagi ein munur á 2.400 kr. + barnafrádrátt. Havast skal so í huga, at tað bert er ein heilt lítil partur av fólkapensjónistunum, sum hava útreiðslur til bústað, meðan ein partur av støkum uppihaldarum sannlíkt hava lutfalsliga stórar bústaðarútreiðslur. Í teimum førum hetta er galdandi, hevur bústaðarmynstrið sostatt við sær, at munurin á nýtslumøguleikum hjá hesum báðum bólkum er størri enn tað, sum inntøkuhátturin vísir.

## Býtisbúskapur (naturaløkonomi)

Inntøkuhátturin tekur ikki hædd fyri býtisbúskapinum, sum í ein ávísan mun er galdandi í Føroyum. Tað fyriliggja ongar kanningar og hagtøl um vavið av býtisbúskapi í Føroyum, og hvussu býtisbúskapur ávirkar korini hjá teimum familjum og einstaklingum, sum brúka býtisbúskap. Fólkateljingin[35] vísir, at 70 prosent av húskjunum seinasta árið sjálvi hava útvegað sær ella hava fingið fisk, sum ikki er keyptur. Eisini eru fleiri enn 50 prosent av húskjunum, sum á sama hátt hava fingið matískoyti frá seyði ella grind. Tað eru einans 18 prosent, sum ikki hava atgongd til ikki-handilsligt matískoyti. Men hesi tølini siga ikki nakað um, hvussu stóran týdning ókeypis matískoytið hevur í gerandisdegnum hjá húskjunum.

Mett verður tó ikki, at matískoyti hevur avgerðandi týdning fyri fjøldina av føroysku húskjunum, tí matbúsketti er hóast alt avmarkaður partur av húskisútreiðslunum. Í Føroyum finnast ikki hagtøl yvir nýtslumynstur hjá familjum – t.v.s., hvussu útreiðslurnar hjá einstøku húskjunum er býttar í høvuðsbólkar. Í Danmark brúkar eitt húski umleið 13 prosent av útreiðslunum í miðal til mat og drekkivørur.

Tey húski, sum liva av tí, sum náttúran hevur at bjóða, og sum hava eitt slag av býtisbúskapi, hava vanliga eisini lægri inntøkur. Í pengum kunnu hesi vera fátøk, og sambært inntøkuháttinum eru tey fátøk. Men tey hava atgongd til annað tilfeingi, sum merkir, at grundleggjandi tørvirnir verða nøktaðir.

## Stakir uppihaldarar í serligum fátækravåða

Støk við børnum hava í øllum samfeløgum trengri fíggjarlig kor enn aðrir samfelagsbólkar.[36] Tað eru sjálvandi stakir uppihaldarar, sum ikki eru illa fyri fíggjarliga, men tann generella myndin í Evropa er, at børn í familjum við einum

[35] Manntal 2012
[36] Lone parents, poverty and policy in the European Union, Bradshaw and Chzhen, 2012

uppihaldara í munandi størri mun hava trengri fíggjarlig kor enn onnur. Soleiðis er eisini í Føroyum. Í Føroyum og norðurlondum annars er tað tó tann fyrimunur, at møguleiki er fyri skipaðari barnaansing fyri lágan kostnað og við einum høgum kvaliteti. Hetta merkir, at uppihaldarin hevur betri møguleika at luttaka á arbeiðsmarknaðinum og harvið skapa sær eitt lívsgrundarlag.

Kanningin hjá Hagstovuni vísir sum nevnt, at tað serliga eru stakir uppihaldarar, sum eru fátækir. Talið av teimum er munandi størri enn fyri onnur húski, og tey eru samstundis munandi langt undir markinum.

Tað eru serliga stakir uppihaldarar við børnum í aldrinum 0-5 ár, sum eru fátækir, men eisini stakir uppihaldarar við eldri børnum eru fátøk. Skipanin við fríplássum á dagstovnaøkinum er skrúvað soleiðis saman, at stakir uppihaldarar mugu arbeiða niðursetta tíð ella fyri lága løn. Hóast støku uppihaldararnir høvdu havt møguleikan at arbeitt meira, t.d. við at skifta til eitt betri lønt starv, økt um arbeiðstíðina o.s.fr., so forðar skipanin fyri, at hesi hava møguleika at betra um fíggjarligu viðurskiftini.

**Inntøka stakur uppihaldari við 2 børnum í ávikavist barnagarðs- og vøggustovualdri**




Borgarir, sum hava árligar lønarinntøkur millum 65.000 kr. og 500.000 kr., hava eitt marginalskattaprosent upp á 46 prosent (íroknað arbeiðsmarknaðargjøld og við miðal kommunuskattaprosenti). Skipanin við fríplássum virkar soleiðis, at tey húski, sum hava inntøkur lægri enn uml. 244.000 kr., fáa fult frípláss á dagstovnum. Gjald fyri ansing hækkar so stigvíst við hægri inntøkum. Fult gjald er, tá húskisinntøkan er uml. 284.000 kr. Í praksis virkar hetta sum ein progressivur skattur, og myndin omanfyri vísir, at við 2 børnum í dagstovnaaldri er faktiska marginalskattaprosentið í intervallinum 240.000-284.000 kr. upp á 132 prosent. Við øðrum orðum so lækkar tøka inntøkan t.d. við at fara úr niðursettari arbeiðstíð upp í fulla tíð. Júst intervallið 240.000-284.000 kr. rakar nógvar yrkisbólkar í Føroyum – t.d. sjúkrarøktarfrøðingar, pedagogar og lærarar, tí havast skal í huga, at inntøkan skal langt upp um 284.000 kr., áðrenn tað munar á botnlinjuni. Um vit í døminum omanfyri taka støði í einum persóni,

sum fer upp í løn frá 19.500 kr. um mánaðin áðrenn skatt til 26.500 kr. um mánaðin, fær eina hækking í tøku inntøkuni upp á 250 kr. V.ø.o. ein mánaðarlig hækking í inntøkuni á 7.000 kr. brutto gevur 250 kr. netto. T.v.s., at skipanin við fíggjarligum fríplássum á dagstovnaøkinum er við til at fasthalda stakar uppihaldarar í eini láglønarstøðu.

Flestu støku uppihaldarar arbeiða niðursetta tíð ella fyri lága løn fyri at varðveita rættin til fríplláss. Tá inntøkan fer upp um 244.000 kr., minkar tøka inntøkan, og ikki fyrr enn inntøkan fer upp um uml. 300.000 kr., byrjar tøka inntøkan aftur at økjast. Um persónurin í døminum omanfyri økir lønarinntøkuna við 150.000 kr. um árið (úr 235.000 upp í 385.000 kr.), so hækkar tøka inntøkan við umleið 48.000 kr.

Tað finnast ikki hagtøl yvir útbúgvingarstøði, arbeiðstíð og starvsøki hjá støkum uppihaldarum, og tí ber ikki til neyvt at siga, um stakir uppihaldarar yvirhøvur hava møguleika at økja munandi um inntøkurnar. Men tað er greitt, at tað eru bert fáir lønarsáttmálar, sum geva lønmóttakarum møguleika at fara longri upp enn 300-350.000 kr. árliga. Sostatt hava flestu støku uppihaldarar onki annað val enn at halda seg á eini inntøku, sum er lægri enn 244.000 kr./ár.

Ein løntakari við árligari lønarinntøku á 240.000 kr. hevur eina inntøku eftir skatt og gjøld upp á uml. 12.200 kr. um mánaðin + barnafrádrátt á uml. 1.000 kr. um mánaðin fyri hvørt barnið.

Hetta sama er galdandi fyri t.d. tvey lesandi, sum hava børn. Tað at annar ella bæði arbeiða við síðurnar av lesnaðinum koma undir somu avmarkingar, sum tann staki uppihaldarin nevndur omanfyri.

## Fólkapensjónistar og fátækradømi

Sum nevnt eru stakir fólkapensjónistar uttan aðra inntøku enn fólkapensjón og samhaldsfasta eisini undir fátækramarkinum. Fólkapensjónin er samansett soleiðis (mánaðarligar upphæddir 2014):

| | Fólkapensjón | |
|---|---|---|
| | *Støk* | *Gift* |
| **Grundupphædd** | 4.169 | 3.313 |
| **Viðbót** | 3.271 | 2.531 |
| **Viðbót til ávísar pensjónistar** | 634 | 317 |
| **Samhaldsfasti** | 2.930 | 2.930 |
| **Mánaðarlig inntøka** | **10.891** | **8.988** |
| | | |
| **Skattur** | 963 | 645 |
| **Heilsutrygdargjald** | 194 | 190 |
| **Inntøka eftir skatt og heilsutrygdargjald** | **9.847** | **8.256** |

Tað eru umleið 2/3 av øllum føroyskum fólkapensjónistum, sum fáa fulla pensjón – t.v.s., at tey ikki hava inntøku aftrat, sum verður mótroknað í fólkapenjónini. Um inntøkan er høg ella lág samanborið við hini norðurlondini, er ikki gjørligt at siga, tí pensjónsskipanirnar eru so ymiskar. Talvan niðanfyri vísir pensjónsupphæddir til fólk, sum ikki hava spart upp til egna pensjón.

**Fólkapensjón í 2011 hjá teimum, sum ikki hava spart upp til egna pensjón ( DKK)**

| Danmark | Føroyar | Finnland | Ísland | Norra | Svøríki |
|---|---|---|---|---|---|
| 9.350 | 9.419 | 5.132 | 7.053 | 13.024 | 5.591 |

**Partur av fólkapensjónistum, sum ikki hava mótroknaða pensjón**

| Danmark | Føroyar | Finnland | Ísland | Norra | Svøríki |
|---|---|---|---|---|---|
| 29 % | 65% | 5 % | 6 % | 25 % | 5 % |

Kelda: Social tryghed i de nordiske lande , Nososco 2012

Sum tað sæst omanfyri, so eru upphæddirnar í høvuðsheitum lægri í hinum norðurlondunum, men tað sæst eisini, at tað eru bert heilt fáir borgarar, sum fáa upphæddirnar í talvunum. Flestu pensjónistarnir hava persónligar pensjónsuppsparingar, og merkir hetta, at tey hava hægri inntøkur enn í talvunum omanfyri. Hetta merkir samstundis, at avbjóðingin við, at eldra ættarliðið økist í tali, er størri í Føroyum enn í øðrum norðurlondum, tá tað snýr seg um pensjónsútreiðslur, tí sum nevnt hava borgarar í hinum norðurlondunum egnar pensjónir. Tó skal nevnast, at ein partur av føroysku upphæddini omanfyri stavar frá Samhaldsfasta, og tískil áliggur tann parturin ikki á landskassanum.

Fólkapensjónistar, sum fáa fulla pensjón, kunnu hava inntøku upp í 61.500 kr., áðrenn pensjónin verður mótroknað (hjún kunnu tilsamans hava inntøku á 123.000 kr.). Lutfalsligi parturin av fólkapensjónistum, sum ikki hevur inntøku aftrat pensjónini, hevur síðstu 10 árini verið støðugur. Tað er í løtuni ikki gjørligt at siga, hvørt supplerandi inntøkan hjá pensjónistum stavar frá privatum pensjónsuppsparingum ella frá arbeiði. Men staðfestast kann, at tað er ongin vøkstur í talinum av fólkapensjónistum, sum hava inntøku aftrat pensjónini.

Talvurnar niðanfyri vísa inntøkurnar, sum fólkapensjónistar hava aftrat fólkapensjónini. Hjá teimum, sum í myndini niðanfyri hava supplerandi inntøkur úr 1.000 og upp í 20.000 kr., stava inntøkurnar í høvuðsheitum frá rentuinntøkum, og tað týður uppá, at hesi hava tøkan pening. T.v.s., at tað eru serliga tey, sum hava inntøkur undir 1.000 kr. árliga, sum eru relevant at umrøða í mun til fátækradømi.

**Árlig inntøka aftrat fólkapensjón og samhaldsfasta - støk**




Kelda: Almannamálaráðið

**Árlig inntøka aftrat fólkapensjón og samhaldsfasta - gift**




Kelda: Almannamálaráðið

Tað eru millum 1/4 og 1/3 av fólkapensjónistum, sum hava inntøku á í minsta lagi 50.000 kr. um árið aftrat pensjónini. Í 2003 vóru tað 44,7 prosent av øllum fólkapensjónistum, sum høvdu supplerandi inntøku á undir 10.000 kr. um árið, meðan parturin í 2012 var 43,9 prosent. Sum nevnt eru allir stakir fólkapensjónistar tryggjaðir uml. 9.850 kr. um mánaðin, og eini hjún hava tilsamans 16.500 kr. um mánaðin eftir skatt og gjøld.

Tað er ikki óvanligt í almenna kjakinum at hoyra politikarar, áhugabólkar og onnur taka fram fólkapensjónistar, sum einans hava fólkapensjón og samhaldsfasta at liva av, sum ein fíggjarliga veikan bólk. Vanliga verður sipað til teir umleið 4500 fólkapensjónistarnar, sum móttaka grundupphædd og fulla viðbót – t.v.s., tey hava ikki nóg stóra supplerandi inntøku til, at viðbótin verður mótroknað. Inntøkan umframt

pensjónina skal vera hægri enn 61.500 kr. um árið, fyri at viðbótin skal kunna mótroknast.

Tey politisku uppskot, sum hava verið frammi síðstu árini um at hjálpa hesum bólkinum, snúgva seg um at hækka viðbótina til fólkapensjón og viðbót til ávísar pensjónistar. Men sambært hagtølum um rentuinntøkur hjá fólkapensjónistum eru greiðar ábendingar um, at ein partur av hesum fólkapensjónistum hava lutfalsliga stórar upphæddir av innistandandi peningi ella partabrøvum. Meginparturin av fólkapensjónistunum hava eina árliga rentuinntøku upp á 1.000-2.000 kr., men eisini er ein partur av teimum, sum "*bara hava fólkapensjón og samhaldsfasta at liva av*", ið hava rentuinntøkur upp ímóti 60.000 kr. um árið, og týður hetta upp á stórar upphæddir av tøkum peningi.

Tað hava seinnu árini verið 300-400 fólkapensjónistar, sum onga inntøku hava havt yvirhøvur – heldur ikki rentuinntøku.

Tað eru eisini fólk, sum fáa sokallaða brøkpensjón. Hetta eru borgarar, sum í styttri tíð hava búð í Føroyum, og sum sostatt ikki hava vunnið rætt til fulla pensjón. Hesi eru ikki við í myndunum omanfyri. Í 2010 var talan er um 36 fólk, sum búðu í Føroyum, og sum fingu brøkpensjón, harav 8 ikki søkja um viðbót til fólkapensjón (orsøkin til, at fólkapensjónistar ikki søkja um viðbót, er vanliga, at tey hava ov høga inntøku aftrat pensjónini). T.v.s., at 28 fólk eru í vanda fyri at hava serliga lágt lívsgrundarlag, men meginparturin av teimum 28 eru gift, og hava harvið annað uppihaldsgrundarlag enn bert egna brøkpensjón. Almannaverkið er vitandi um einstakar brøkpensjónistar, sum eru í einkjustøðu, og í teimum førum verður fíggjarligi spurningurin loystur við persónligari viðbót sum ískoyti til pensjónina. Væntandi fer talið av brøkpensjónistum at vaksa komandi árini, tí talið av útlendingum í Føroyum er økt seinnu árini.

## Fátækradømi og sosialar veitingar

Í øðrum londum er tað soleiðis, at høvuðsorsøkin til at fólk eru fátøk ella eru undir einum fátækramarki, er, at tey eru uttanfyri arbeiðsmarknaðin. Hetta er galdandi í øllum londum uttan mun til vælferðarstøði, arbeiðsmarknaðarmøguleikar og vavið av fátækradømi.[37] Hetta er orsakað av, at inntøkumøguleikarnir eru serliga avmarkaðir, tá ein er uttanfyri arbeiðsmarknaðin. Sosialar veitingar eru vanliga á einum lægri støði uttanfyri norðurlond. Norðurlond hava hægri sosialar veitingar enn í øðrum londum, men hava eisini eitt høgt lønarstøði, og tí er tað eisini í norðurlondum soleiðis, at tað serliga eru tey, sum ikki arbeiða, sum eisini eru fátøk.

Hagtalsupplýsingar um, hvørja støðu fátøk fólk í Føroyum hava á arbeiðsmarknaðinum, eru ikki tøkar. T.v.s., samanhangurin millum inntøku og støðu á arbeiðsmarknaðinum er ikki kannaður. Men myndin er ikki so einføld í Føroyum, tí nakrar sosialar veitingar

[37] Fattigdom i EU-landene, CASA 2010

eru lutfalsliga høgar í mun til lønarlagið.[38] Nakrar veitingar eru eisini hægri enn fátækramarkið á 60 prosent av miðinntøkuni. Men hóast nógvar veitingar kunnu tykjast høgar, so ber ikki til at konkludera, hvørt tey, sum fáa veitingarnar, eru fátøk ella ikki. Hetta er partvíst tí, at fíggjarliga rásarúmið er tengt at samlaðu inntøkuni hjá tí húskinum, sum ein er partur av. Harumframt er tað soleiðis, at nakrar sosialar veitingar eru tengdar at fyriliggjandi inntøkugrundarlagi. Ein týðandi partur av teimum, sum fáa ALS-veiting, og teimum, sum fáa sjúkradagpening, fáa eina veiting, sum er lægri enn "hægsta gjald". Hetta kann vera tí, at tey hava arbeitt niðursetta tíð, hava verið stutta tíð á arbeiðsmarknaðinum, ella tí tey onkursvegna bert hava avmarkað inntøkugrundarlag. Hinvegin kunnu vit ikki siga, at generelt eru tey, sum fáa eina lága veiting úr ALS, eru fátøk, tí ALS-veitingin er ikki tengd at inntøku hjá møguligum hjúnafelaga.

Ein lutfalsliga stórur bólkur, har veitingin er lægri enn fátækramarkið, eru fólk, sum fáa forsorgarveiting, og sum ikki hava børn. Havast skal tó í huga, at ein týðandi partur av hesum fólkum fáa forsorgarveiting í avmarkaða tíð. Talan er um eina fyribils hjálp, og tað eru nógv, sum fáa veiting í nakrar vikur ella nakrar mánaðir. Tó er eisini nøkur, sum í longri tíð eru í skipanini, men tað eru bert heilt fá, sum fáa hesa veitingina í fleiri ár.

Vert er eisini at leggja til merkis, at sambært upplýsingum frá ÍMGT, so eru meira enn helvtin av teimum, sum fáa hjálp frá ÍMGT, sum hava sítt lívsgrundarlag frá arbeiðsmarknaðinum ella frá arbeiðsmarknaðarskipanum (sí síðu 46)

Framskrivaða fátækramarkið á 60 prosent av miðinntøkuni er í 2013 117.548 kr. eftir skatt og gjøld um árið, svarandi til umleið 9.796 kr. um mánaðin. Fleiri sosialar veitingarnar eru hægri enn hesar upphæddir. Niðanfyri er eitt yvirlit yvir tær mest vanligu sosialu veitingarnar eftir skatt og gjøld, sum eru galdandi ultimo 2013 (hjá fólki uttan børn og við miðal kommunuskattaprosenti), samanborið við lægstu sáttmálalønirnar á arbeiðsmarknaðinum.

| | **Upphædd um mánaðin** |
|---|---:|
| 60 prosent av miðinntøku - støk | 9.796 |
| S&K byrjunarløn full tíð | 11.068 |
| FA-tímaløntur full tíð | 11.800 |
| ALS – hámarksgjald | 10.924 |
| Hægsta fyritíðarpensjón | 12.902 |
| Miðal fyritíðarpensjón | 10.658 |
| Lægsta fyritíðarpensjón | 9.382 |
| Forsorgarveiting støk u/børn | 8.248 |
| Forsorgarveiting stakir uppihaldarar | 9.607 |
| Arbeiðsbúgving støk u/børn | 9.154 |
| Arbeiðsbúgving stakir forsyrgjarar | 10.513 |
| Fólkapensjón – støk | 9.779 |
| Fólkapensjón – gift tilsamans | 16.349 |

[38] Sosialar veitingar í Føroyum og norðurlondum; Heildarætlan, Fólkaflyting og fólkavøkstur, Vinnumálaráðið 2013

Lægsta fyritíðarpensjón til ein giftan persón er uml. 7.400 kr. eftir skatt, men av tí at tað er inntøkan hjá húskinum, sum sigur nakað um nýtslumøguleikarnar, skal inntøkan hjá hjúnafelaga roknast upp í (møgulig inntøka hjá hjúnafelaga verður ikki mótroknað í fyritíðarpensjónini) Tískil ber ikki til at siga nakað um fíggjarligt rásarúm hjá giftum fólkum einans við at hyggja at satsinum á sosialu veitingini.

Javnvirðisinntøkan eftir 60 prosents markinum hjá einum støkum uppihaldara við einum barni er í 2013 152.398 kr. um árið svarandi til 12.700 kr. um mánaðin.[39] Ein stakur uppihaldari hevur vanliga rætt til barnafrádrátt, barnagjald til stakar uppihaldarar og barnaískoyti, og er hetta tilsamans 2.669 kr. um mánaðin. Tað vil siga, at hjá støkum uppihaldarum skal tann veitingin leggjast aftrat upphæddunum í yvirlitinum omanfyri. Ein stakur uppihaldari við einum barni, sum fær forsorgarhjálp, fær sostatt 9.607+2.669 = 12.276 kr. um mánaðin, og er harvið beint undir markinum.

Stakir uppihaldarar, sum fáa veiting eftir pensjónslógini, fáa harumframt eisini barnaviðbót, sum er 1.074 kr. um mánaðin, og sostatt skulu 3.743 kr. leggjast aftrat hjá hesum. Ein stakur lægsti fyritíðarpensjónistur við einum barni fær sostatt 9.382+3.743 = 13.125 kr. um mánaðin, og er sostatt omanfyri fátækramarkið.

**Samanbering av inntøkum hjá støkum uppihaldara við einum barni (íroknað allur barnastuðul)**

| | Upphædd um mánaðin |
|---|---|
| Undir útbúgving (Studni) | 8.954 kr. (lán ikki íroknað) |
| Undir útbúgving við lærlingaløn (S&K) | 9.055 kr. |
| Í starvi undir sáttmála hjá Havnar Arbeiðskvinnufelag | 14.487 kr. |
| Í starvi – ófaklærd – undir sáttmála hjá S&K | 13.250 kr. |
| Forsorgarveiting frá AV | 12.977 kr. |
| Lægsta fyritíðarpensjón | 13.125 kr. |

At fleiri av sosialu veitingunum í Føroyum eru hægri enn fátækramarkið, merkir, at fátækradømi í minni mun enn í øðrum londum kann forklárast út frá manglandi tilknýti til arbeiðsmarknaðin. Men sum nevnt eru tað fólk, sum fáa niðursetta veiting ella eru partur av einum húski, sum tilsamans hevur lága inntøku, og í tann mun hevur tað sjálvandi týdning. Samanhangurin millum manglandi arbeiðsvirkni og fátækradømi er tó sannlíkt ikki eins stórur sum í øðrum londum.

[39] Nýggjasta talið, sum er tøkt, er frá 2011. Hetta er framskrivað til 2013 við miðalvøkstrinum 2009-2011

# 6. Jólahjálp frá ÍMGT

Upplýsingar frá felagsskapinum ÍMGT sampakka við aðrar hagtalsupplýsingar so sum kanningin um inntøkubýtið hjá Hagstovu Føroya.

Sum nevnt eru tað serliga stakir uppihaldarar, sum hava lágar inntøkur, og har inntøkugloppið er munandi størri enn hjá øðrum bólkum. Tað eru einans familjur við børnum, sum fáa hjálp frá felagsskapinum ÍMGT, men sambært felagsskapinum eru 2/3 av teimum, sum søkja, stakir uppihaldarar - tey flestu av teimum eru kvinnur, tó eru eisini fleiri menn við børnum.

Parlagsstøða




Kelda: Í menniskjum góður tokki

Inntøkukeldan hjá umsøkjarunum til ÍMGT er í høvuðsheitum frá ymsum vælferðarskipanum, sum settar eru í verk. 31 prosent av umsøkjarunum arbeiða, men inntøkan er væl minnið enn t.d. ein arbeiðaraløn við 40 tíma viku. Inntøkutølini hjá teimum, sum eru á arbeiðsmarknaðinum, samsvara eisini við aðrar kanningar, sum vísa, at ein lutfalsliga stórur partur av fjøldini á arbeiðsmarknaðinum í Føroyum arbeiðir niðursetta tíð.

Sambært Manntal eru tað 70 prosent av teimum, sum arbeiða niðursetta tíð, sum gera tað sjálvboðið, meðan 30 prosent kundu hugsað sær at arbeitt meira. ÍMGT upplýsir, at hjá teimum, sum søkja um jólahjálp, er niðursetta arbeiðstíðin ikki sjálvboðin, men treytað av arbeiðsmarknaðinum – hetta óansæð um talan er um almenna ella privata arbeiðsmarknaðinum.

ÍMGT upplýsir, at í fleiri av umsóknunum um jólahjálp vísa umsøkjarar á, at tey kundu hugsað sær at arbeitt meir, men tað er ov lítið av fiski, sum kemur upp á land, ella at stovnurin ella heilsu- og almannaverkið er soleiðis skipað, at fólk einans sleppa at arbeiða niðursetta tíð.

Sum nevnt omanfyri, so hava flestu av umsøkjarunum til jólahjálp almennar vælferðarskipanir sum inntøkukeldu. Nógvir av umsøkjarunum eru raktir av støðum, sum brádliga eru íkomnar – sjúka, deyði, arbeiðsloysi, samlívsslit eru nakrar av sosialu hendingunum, sum kunnu gera, at tilverugrundarlagið broytist grundleggjandi.




Kelda: Í menniskjum góður tokki

Tað eru serliga bústaðarútreiðslur, sum hava týdning, og møguleikarnir eru lítlir fyri bíligum bústøðum.

Um hugt verður at, hvussu fólk búgva, sæst, at tey flestu, sum søkja jólahjálp, búgva til leigu. Fleiri eru eisini, sum ikki kunnu seta búgv sjálvi ella eru noydd at flyta heim til foreldrini, tá ið tey fáa børn.




Kelda: Í menniskjum góður tokki

Tað sæst aftur í umsóknunum, at tað serliga er býliskostnaðurin, sum fer við størsta partinum av tøku inntøkuni hjá familjunum. Møguleiki er ikki at búgva bíligt ella øðrvísi.

Í Føroyum verður rentustuðul veittur, men bústaðarstuðul til leigubúðstaðir verður ikki veittur, tískil kunnu fólk, sum búgva til leigu, mangan vera verri fyri enn tey, sum fáa møguleika at seta føtur undir egið borð. Hetta er eisini við til at vaksa um gjónna millum ymsu inntøkubólkarnar.

# 7. Niðurstøða

Arbeiðsbólkurin skal sambært arbeiðssetninginum lýsa ymsar hættir at áseta fátækramørk og skal meta um, hvør háttur og hvørjar dátur skulu vera grundarlag undir einum føroyskum fátækramarki.

Arbeiðsbólkurin hevur viðgjørt teir tríggjar hættirnar, sum eru teir, ið vera brúktir í sambandi við kjak og viðgerðir av fátækradømi í øðrum londum. Onnur framkomin lond, sum vit í Føroyum vanliga samanbera okkum við, hava vanliga ikki almenn fátækramørk, men í flestu londunum verða tað við jøvnum millumbilum gjørdar kanningar og lýsingar av gongdini við fátækradømi, sum byggja á ymsar indikatorar, sum eru grundaðir á teir tríggjar hættirnar.

Teir tríggir hættirnir, sum talan er um, eru:

- Inntøkuhátturin
- Búsketthátturin
- Saknhátturin

Hesir tríggir hættirnir hava allir sínar styrkir og sínar vansar. Hættirnir eiga ikki at standa einsamallir, men eiga at stuðla hvørjum øðrum saman við øðrum supplerandi kanningum.

Tað eru í Føroyum ikki gjørdar kanningar eftir saknháttinum, og hevur arbeiðsbólkurin tískil ikki viðgjørt saknháttin í sambandi við eitt føroyskt fátækramark. Kanningar eftir saknháttinum høvdu betra um vitanargrundarlagið um fátækradømi í Føroyum, men talan er um rættiliga víðfevndar kanningar, sum eru lutfalsliga kostnaðarmiklar at gera.

Sambært allýsingini av fátækradømi er fátækradømi definerað soleiðis:

> *At vera varandi avmarkaður frá at liva eitt lív við teimum materiellu ressursunum, sum eru í tráð við alment aksepterað livikor og lívshátt og ikki hava møguleika fyri sjálvur at koma sær úr støðuni.*

Grundarsteinurin undir føroyska fátækramarkinum eigur at vera inntøkuhátturin. Hóast hini norðurlondini í høvuðsheitum brúka eitt mark upp á 50 prosent av miðinntøkuni sum mát í sambandi við fátækrakjakið, so mælir arbeiðsbólkurin til at halda fast við 60 prosent markið, sum longu í dag verður framleitt og viðgjørt í árligum kanningum hjá Hagstovu Føroya.

Kanningar eftir búsketthættinum stuðla undir at brúka markið á 60 heldur enn 50 prosent. Arbeiðsbólkurin hevur gjørt eitt sokallað minstabúskett, sum inniheldur neyðugar og rímiligar dagligar útreiðslur hjá ymsum familjustøddum. Búskettið inniheldur ikki útreiðslur til bústað, og er orsøkin fyrst og fremst, at munurin á útreiðslum til bústað er ógvuliga stórur frá húski til húski.

**Mánaðarlig upphædd sambært inntøkuháttinum og sambært búskettháttinum**[40]

| | 60 % av miðinnt.* | Búskett** |
|---|---|---|
| Støk | 9.796 | 6.966 |
| Par uttan børn | 14.770 | 9.986 |
| Støk kvinna við einum barni | 12.800 | 9.116 |
| Støk kvinna við tveimum børnum | 15.754 | 11.563 |
| Par við tveimum børnum | 20.677 | 14.267 |
| Par við 4 børnum | 26.585 | 19.074 |
| Stakur fólkapensjónistur | 9.796 | 6.295 |
| Par fólkapensjónistar | 14.770 | 9.222 |

*60 prosent av miðinntøkuni er talið frá 2011 framskrivað til 2013

**Bústaðarútreiðslur eru ikki íroknaðar í búskettinum

Bústaðarútreiðslur hjá pørtum av húskjunum í Føroyum eru avmarkaðar til viðlíkahald, ella hava tey hava lágar útreiðslur til rentur og avdrøg, meðan húskir, sum eru nýggj á bústaðarmarknaðinum, í nógvum førum brúka meginpartin av tøku inntøkuni til at gjalda rentur og avdrøg. Arbeiðsbólkurin metir ikki tað vera rætt at áseta eitt miðaltal fyri bústaðarútreiðslur, tí tað eru ov nógv húskir, sum ikki kenna seg aftur í einum miðaltali. Harumframt er eitt miðaltal avmarkað av vantandi hagtalsgrundarlagi yvir bústaðarútreiðslur hjá føroyskum húskjum.

Sambært búskettinum er lítið og onki fíggjarligt rásarúm upp til markið á 50 prosent, og er tað høvuðsorsøkin til, at arbeiðsbólkurin mælir til at brúka markið á 60 prosent av miðinntøkuni sum fátækramark. Hjá húskjum, ið hava høgar bústaðarútreiðslur, er markið á 60 prosent møguliga eisini ov lágt. Fátækramarkið skal tí ikki skiljast soleiðis, at øll, sum hava inntøku undir markinum, eru fátøk, og øll tey, sum hava inntøku hægri enn markið, eru ikki fátøk.

Inntøkuhagtøl vísa, at tað í Føroyum er ein bólkur fram um øll onnur, sum eru fátøk, og tað eru stakir uppihaldarar. Stakir uppihaldarar undir markinum á 60 prosent, eru lutfalsliga nógvir í tali, og tey, sum eru undir markinum, eru munandi nógv longri undir markinum enn aðrir bólkar, sum hava verið nevndir. At tað serliga eru tey, sum hava børn yngri enn 5 ár, sum eru fátøk, kann vera orsakað av skipanini við fríplássum á dagstovnaøkinum, sum er við til at fasthalda hendan bólkin í eini lág12inntøkustøðu. Men tað kunnu eisini vera aðrar orsøkir, so sum at stakir uppihaldarar kunnu heilt einfalt hava trupult við at fáa gerandisdagin at hanga saman við einum fulltíðarstarvi.

Í øllum øðrum londum er tað soleiðis, at tað fyrst og fremst eru fólk uttanfyri arbeiðsmarknaðin, sum eru undir fátækramarkinum. Hetta er eisini galdandi í Føroyum, men tó í minni mun enn í øðrum londum.

Ein bólkur, sum serliga hevur verið tikin fram í sambandi við fátækrakjakið í Føroyum, eru fólkapensjónistar, sum sambært kanningini um inntøkubýtið hjá Hagstovu Føroya liggja beint undir markinum á 60 prosent. Men sambært eini livikorskanning um fólkapensjónistar frá 2010 er tað bert ein lítil partur av fólkapensjónistum, sum hava

[40] Í dømunum við búsketttháttinum er aldurin á børnunum samsvarandi yvirlitinum á síðu 21

bústaðarútreiðslur út yvir viðlíkahald o.tíl. Sama kanningin vísir, at upp á spurningin um, hvussu húsarhaldsinntøkan røkkur, svara 9 av 10 fólkapensjónistum, at inntøkan røkkur væl ella sera væl. Eisini vísa hagtøl, at ein partur av fólkapensjónistunum, sum einans hava inntøku frá fólkapensjón og samhaldsfasta, hava innistandandi pening, sum tey kunnu brúka av. Hetta saman við kanningini eftir búsketthháttinum, metir arbeiðsbólkurin, at fólkapensjónistar sum bólkur sum útgangsstøði ikki skulu definerast sum fátøk – heldur ikki tey, sum einans hava inntøku frá fólkapensjón og samhaldsfasta. Nakrir fólkapensjónistar eru sjálvandi, sum hava truplar fíggjarligar umstøður og kunnu lýsast sum fátækir, men tað er eitt avmarkað tal, sum kann stava frá høgum bústaðarútreiðslum, persónligari skuld ella øðrum serligum tørvi.

Úrslitini úr livikorskanningini hjá fólkapensjónistum broytast við tíðini, og tískil mælir arbeiðsbólkurin til, at livikorskanningin – ella partar av kanningini – verða dagførdir við jøvnum millumbilum.

Hagtøl um inntøkubýtið eiga at útgreinast, soleiðis at munur kann gerast á lesandi og ikki-lesandi. Sum nevnt omanfyri hevur arbeiðsbólkurin definerað lesandi sum ikki fátøk, tí talan er vanliga um eina sjálvvalda støðu, sum sannlíkt broytist eftir eini tíð.

At talið av fátøkum er lágt, er til fyrimuns fyri tann einstaka borgaran, og er eisini til fyrimuns fyri samfelagið alt. Fátækramarkið á 60 prosent av miðinntøkuni kann við fyrimuni supplerast við útgreining av tølunum, sum í dag verða framleidd av Hagstovu Føroya, og við kanningum eftir saknháttinum. Ein neyvari lýsing av hagtølunum er neyðug fyri at málrættað møgulig átøk móti teimum, sum eru ringast fyri og hava størsta tørvin. Landsstýrið fær sostatt við fátækramarkinum betri møguleika at seta sær mál fyri fátækradømi, og fátækramarkið kann brúkast sum eitt mát, soleiðis at til ber at fylgja við gongdini í fátækradøminum.

# Fylgiskjal 1

## Arbeiðssetningur hjá bólki, sum skal arbeiða við einum føroyskum fátækramarki

Eitt av høvuðsmálum við vælferðarsamfelagi okkara er at fyribyrgja, at borgarar í Føroyum liva í fátækradømi. Somuleiðis er tað landsstýrisins vilji, at allir borgarar skulu fáa møguleikan til eitt virkið og sjálvstøðugt lív. Vit ásanna, at persónliga vælferðin og møguleikin fyri einum virknum og sjálvstøðugum lívi í ein ávísan mun er tengt at fíggjarligum rásarúmi hjá familjum og einstaklingum. Landsstýrið, eins og Løgtingið eisini hevur víst á, metir at neyðugt er at seta ein bólk av serkønum at útgreina, hvussu eitt fátækramark kann fyribyrgja fátækradømi í Føroyum.

Í Føroyum er ongin almenn definisjón av fátækradømi, og trupult kann tí vera at eyðmerkja, hvør er fátækur, og hvørji átøk skulu til fyri at stuðla undir, at fólk koma úr fíggjarligari trongstøðu.

Landsstýrið setir ein arbeiðsbólk at arbeiða við fátækradømi og at koma við tilmælum um eitt møguligt føroyskt fátækramark. Fátækramark er ikki eitt eintýðugt hugtak. T.d. OECD, Heimsbankin og ES hava allýsingar av fátækradømi, sum ikki neyðturviliga eru egnaðar at brúka í Føroyum. Í teimum norðurlondum og vesturheimurin annars, sum hava fátækramark, er eisini ymiskt, hvussu tað verður brúkt. Tørvur er at lýsa fátækradømi frá einum føroyskum sjónarhorni, og at lýsa tey serligu føroysku viðurskiftini, sum eru viðkomandi, tá talan er um fátækradømi.

Eitt fátækramark skal stuðla landsstýrinum í at eyðmerkja fátækradømi, og harvið geva landsstýrinum betri grundarlag at eyðmerkja og seta í verk átøk at fyribyrgja fátækradømi.

Arbeiðsbólkurin skal hava til endamáls at:

- eyðmerkja og lýsa orsøkir til at fólk liva í fátækradømi,
- nágreina, hvat eitt fátækramark skal brúkast til,
- lýsa ymsar hættir at áseta fátækramørk,
- greina og meta um, hvør háttur og hvørjar dátur skulu vera grundarlag fyri einum føroyskum fátækramarki og harvið gera tilmæli um, hvussu eitt føroyskt fátækramark skal ásetast.

Arbeiðsbólkurin handar landsstýrinum síni tilmæli í apríl 2013.

# Skjalalisti

Arbeids- og Inkluderingsdepartementet 2006: Handlingsplan mod fattigdom

Arbejderbevægelsens Erhvervsråd 2011: Den sociale arv tynger Danmark

Bradshaw and Chzhen 2012: Lone parents, poverty and policy in the European Union

Danmarks Statistik 2012: Levevilkår – måling af fattigdom

European Commission 2011: Evaluation of the European Year for Combating Poverty and Social Exclusion

European Commission 2010: Joint report on Social Protection and Social Inclusion

European Commission 2010: Reducing health inequalities in the European Union

FAFO-rapport 2011:21: Kunnskap om fattigdom i Norge

Finn Kenneth Hansen, CASA, 2010: Fattigdom i EU-landene

Fólkaheilsuráðið 2013: Føroyar besta land í heiminum

Fróðskaparsetur Føroya, Søgu- og samfelagsdeildin 2010: Í triðja aldri ráða vit yvir degnum – ein kanning av livikorum hjá fólkpapensionistum

Hansen og Hansen 2004: "At eksistere eller at leve" Fattigdom og lave indkomster i Danmark – hvordan måler man fattigdom

Hjálparstofnun Kirkjunnar and Reykjavík Red Cross 2012: Farsæld (Report on new poverty and inclusion initiatives)

Martti Lujanen 2004: Housing and Housing Policy in the Nordic Countries

Nordens Välfärdscenter 2013: Barnfattigdom

Nososco, Nordisk Socialstatistisk Komité, 2013: Utfordringer for den nordiske velferdsstaten, 2. udgave

Nososco, Nordisk Socialstatistisk Komité, 2012: Social tryghed i de nordiske lande

Rådet for Socialt Udsatte m.fl., 2010: En dansk fattigdomsgrænse

Samfundsøkonomen nr. 5 2010

Socialministeriet 2013: Alle skal med – målsætninger for de mest udsatte frem til 2020

Vinnumálaráðið 2013: Heildarætlan, Fólkaflyting og fólkavøkstur (fylgiskjal 3)